sjókovin
blue resource

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



# KORONAFARSÓTTIN OG FØROYSKA FISKI- OG ALIVINNAN

## Ávirkanin av Covid-19 á fiski- og alivinnuna og avleiðingarnar fyri føroyska búskapin


Unn Laksá, Sjókovin
Magni Laksáfoss, Sjókovin
Zvonko Mrdalo, Fróðskaparsetur Føroya
Christoffur Gert Nielsen, Sjókovin



Stuðlað av Covid-19 átakinum hjá granskingarráðið
RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

# Formæli

Hetta er fyrsta útgávan hjá Sjókovanum, sum varð stovnaður 30. mars 2020, júst sum korona leikaði harðast á. Sjókovin hevur til endamáls at stimbra burðardygga menning í fiski– og alivinnu gjøgnum gransking í viðkomandi viðurskiftum fyri hesar vinnur. Gjøgnum samrøður við fyritøkur og miðlar annars frættist skjótt um stóru avbjóðingarnar koronastøðan hevði við sær í okkara útflutningsvinnum, og tá granskingarráðið lýsti eftir umsóknum til Covid-19 átakið, var upplagt at taka stig til verkætlan at greina ávirkanina av Covid-19 á føroyska fiski- og alivinnu og avleiðingarnar fyri føroyska búskapin. Verkætlanin er eitt samstarv ímillum Fróðskaparsetur Føroya og Sjókovan.

Tað hevði ikki verið gjørligt, at gjørt hesar greiningarnar uttan servitanina og vælvildina frá fólki í føroysku fiski- og alivinnuni. Vit vilja hervið takka Anfinni Olsen, Atla Gregersen, Boga Jacobsen, Dávid Jacobsen, Dáva Emil Gaardlykke, Eiriki á Húsamørk, Elisabeth Eldevig Ditleivsdóttir Olsen, Eyðuni Olsen, Hans Cartna Rasmussen, Hanusi Hansen, Jens Martini Knudsen, Jens Paula Petersen, Jógvani Gregersen, Jóhannu á Lava Køtlum, Kristian Martin Petersen, Kristmund Johannessen, Magnus Paula Glerfoss, Regini Gregersen, Regini Jacobsen, Sannu Laksá, Stefani í Skorini og Høgni Dahl Jakobsen fyri at brúka tíð og orku uppá at lýsa støðuna og veita viðkomandi hagtøl. Eisini takka vit Granskingarráðnum fyri fígging av verkætlanini.

Tað er okkara vón, at hendan frágreiðingin fer at geva sítt íkast til varpa ljós á avbjóðingarnar av Covid-19; hvussu føroyskar fyritøkur hava tillagað seg til broytandi umstøðurnar, og hvørji stig kunnu takast fyri at økja um framtíðarmótstøðuførið í okkara høvuðsvinnum.

Leirvík, 07.10.2020

Unn Laksá

## Samandráttur

Koronafarsóttin (Covid-19) hevur verið størsta búskaparliga hóttafallið í nýggjari tíð. Minkingin í BTÚ í heimsbúskapinum er meira enn dupult so stór, sum hon var í fíggjarkreppuni í 2009 (World Bank 2020). Ávirkanin er eisini eyðsæð í føroyska búskapinum. Í september 2020 broytti Búskaparráðið útlitini 13,9 prosentstig fyri 2020 - frá einum mettum vøkstri, sum var 7 prosent í várfrágreiðingini, til 6.9 prosent minking í BTÚ samanborið við 2019.

Útlitini broytast alla tíðina, sum farsóttin ferðast millum londini, men seinastu metingarnar hjá OECD (2020) siga, at roknast kann við einari afturgongd í BTÚ í heimsbúskapinum millum 6 og 8 prosent. Afturgongdin í bruttotjóðarúrtøkuni hjá fleiri av stóru útflutningslondum Føroya er væntandi væl størri enn hetta.

Fiskivinnan og alivinnan eru berandi súlurnar undir føroyska búskapinum. Tí hevur virksemið í hesum vinnunum serstakliga stóra ávirkan á føroyska samfelagsbúskapin. Landið fær inntøkur frá hesum vinnunum gjøgnum lønarskatt, partafelagsskatt, kapitalvinningsskatt umframt uppboðssølu-, veiði- og tøkugjøld. Koronastøðan hevur sjálvandi longu havt - og hevur framhaldandi - ávirkan á fiski- og alifyritøkur. Endamálið við hesari verkætlanini er at skjalprógva og greina, hvørja ávirkan Covid-19 hevur havt á føroyskar ali- og fiskivinnufyritøkur higartil og meta um búskaparligu avleiðingarnar fyri vinnurnar og ávirkanina á samfelagsbúskapin sum heild. Dentur verður lagdur á at lýsa ávirkanina á fyritøkurnar í breiðari merking, t.d. framleiðslugongdir og avgerðargongdir umframt marknaðar- og søluviðurskifti.

**Høvuðsendamálið við verkætlanini er at greina ávirkanina av Covid-19 á føroyska fiski- og alivinnu og avleiðingarnar fyri føroyska búskapin.**

Føroyski landskassin hevur seinastu árini gjørt seg meira bundnan av inntøkum frá fiski- og alivinnu. Tí hevur gongdin í hesum vinnunum sera stóra ávirkan á landsbúskapin. Stoytir í búskapinum orsakað av broytingum í tilfeingisgrundarlagnum, sum t.d. í kreppuni í 1990´unum ella av ILA-sjúkuni, sum rakti alivinnuna fyrst í hesari øldini, henda við jøvnum millumbilum.

Høvuðsgrundarlagið undir verkætlanini eru samrøður við lyklapersónar og hagtøl frá føroyskum fiski- og alifyritøkum. Afturat hesum eru almenn hagtøl frá t.d. Hagstovu Føroya og Teyggjuni, umframt at hugt verður eftir altjóða hagtølum og frágreiðingum, millum annað frá heimsbankanum, OECD og International Monetary Fund (IMF).

Verkætlanin hevur hesi ítøkiligu endamálini:

- At greina búskaparligu og bygnaðarligu avleiðingarnar av Covid-19 fyri føroyskar fiski- og alifyritøkur gjøgnum samrøður og simuleringar av ymiskum Covid-19 prísstøðum (scenario).
- At lýsa avbjóðingarnar í sambandi við Covid-19 og møguliga ávirkan á avgerðartilgongdina í vinnunum.
- At eyðmerkja møguleikar og at greina, hvussu fyritøkur kunnu gera seg meira mótstøðuførar ímóti brádligum búskaparstoytum.
- At greina, hvørja ávirkan ymiskar støður (scenario) hava á føroyska búskapin, almenna geiran og fólkatalið.
- At gera niðurstøður um, hvørji stig kunnu takast fyri at gera føroyska vinnu og búskapin meira mótstøðufør.

Tað eru nógvar óvissur í sambandi við frágreiðingina. Tað er óvist, nær ella um ein møgulig koppseting verður tøk. Av tí at koronasmittan enn ferðast kring heimin, er trupult at meta um, hvat framtíðin inniber. Fyri at meta um ávirkanina her í 2020, verður ein baseline Covid-19 støða skapt, sum er grundað á samrøður og hagtøl frá fyritøkunum. Hetta skal í størst møguligan mun endurspegla støðuna, sum hon er nú.

**Korona ávirkar søluna**

Frá samrøðum við lyklapersónar í fiski- og alivinnuni er innlit fingið í, hvørji viðurskifti hava størstu búskaparliga ávirkanina á virksemi teirra. Høvuðsniðurstøðan frá samrøðunum er, at koronafarsóttin hevur havt álvarsamar búskaparligar avleiðingar. Hendan ávirkanin er serliga ígjøgnum fiskaprísirnar, sum eru falnir nógv, samstundis sum eingin stórvegis minking hevur verið í framleiðsluni.

Eisini er greitt, at nógv onnur viðurskifti hava havt búskaparliga ávirkan á virksemið. Sum dømi eru nevnd gjaldoyraviðurskiftini (NOK og USD) og oljuprísurin. Onnur viðurskifti eru eisini nevnd, so sum tilfeingisgrundarlagið og eyðkennið hjá fiskinum, t.d. fitiinnihald og rakfiskur.

Gjøgnum hagtøl frá fyritøkum eru virkisbúskaparligu viðurskiftini í 2020 samanborin við 2019 fyri at fáa eina meting av, hvussu koronafarsóttin hevur ávirkað fyritøkurnar. Hóast nógv onnur viðurskifti gera seg galdandi, er greitt, at korona hevur ávirkað søluna bæði í nøgd og virði við avleiðingum fyri gjaldførið í vinnuni. Tøkan av alifiski øktist, tá Covid-19 fór at gera um seg, og harvið fekk alivinnan minkað um váðan og økt um tøka peningin.

**Fyrimunir við fjølbroytni**

Royndirnar við korona hava tí eisini varpað ljós á nakrar møguleikar. Tað er heilt vist ein fyrimunur at hava meira fjølbroytni í framleiðsluni fyri at standa ímóti, tá brádligir marknaðarstoytir henda. Eitt dømi um hetta er, at alivinnan hevur mest sum alla tíðina fingið selt til onkran marknað, tí korona ikki rakti teir ymsu heimspartarnar í senn. Eisini hevur Bakkafrost gjørt íløgu í eina nýggja framleiðslulinju, sum kann økja framleiðsluna av portiónum munandi.

> Koronakanningarnar og smittusporanin hava gjørt tað møguligt at hava virksemið í gongd í so stóran mun.

Ein av høvuðsniðurstøðunum í hesari frágreiðingini er, at vit hava sera mótstøðuførar fyritøkur, sum hava klárað seg væl ígjøgnum óvanliga stóru avbjóðingarnar. Samrøðurnar við vinnulívsumboðini benda á, at fyritøkurnar hava verið sera fleksiblar og hava megnað at laga seg til broyttu umstøðurnar. Ein fyrimunur er heilt vist, at vit í Føroyum hava havt nøkur serstakliga góð ár sum gera, at fyritøkurnar hava nakað at standa ímóti við. Tað er tó einki at ivast í, at fyritøkurnar hava eina innbygda tillagingarmentan, sum helst er úrslit av einari siðvenju í vinnum, sum eru vanar við stór príssveiggj, sum koma uttanífrá. Rávørugrundarlagið broytist á hvørjum ári, og í alivinnuni eru eisini aðrir váðar, t.d. sjúka. Flestu av vinnulívsfólkunum hava royndir við einari ella fleiri kreppum, sum hava verið ógvusligari enn koronastøðan, vit nú eru í.

**Fleksibilitetur**

Flestu av vinnulívsumboðunum hava tað í felag, at dentur altíð varð lagdur á loysnir. Hetta sást eisini týðiliga, tá ið korona brast á, og fyritøkurnar skjótt og hegnisliga skipaðu síni viðurskifti, so framleiðslan kundi ganga sína vanligu gongd. Hesin fleksibiliteturin sást eisini hjá almennu myndugleikunum og starvsfólkunum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, ið skjótt funnu loysnir við at gagnnýta vitan og útgerð, sum vanliga er brúkt til alivinnuna, og brúka hetta til koronakanningar. Tað, at

koronakanningarnar og smittusporanin hava verið so munagóð, ger, at tað hevur verið møguligt at hava virksemið í gongd í so stóran mun.

Fyritøkurnar hava gjørt tillagingar til broyttu marknaðarstøðuna við at skifta ímillum marknaðarsegment og landafrøðiligar marknaðir. Orsakað av koronastøðuni í útlondum hava tær verið noyddar at selja meira í smásølu til brúkaran. Hetta verður ofta gjørt til ein keypara uttanlands, sum síðani pakkar vøruna til endaliga brúkaran. Eisini hava fleiri av fyritøkunum lagt dent á at optimera raksturin soleiðis, at tær nú standa enn sterkari enn áður.

**Húkaflotin harðast raktur**

Í greiningini, har prísgongdin varð samanborin við undanfarin ár, sást, at prísirnir á fleiri týdningarmiklum fiskasløgnum eru farnir nógv niður. Harðast raktur er húkaflotin, har prísurin á týdningarmestu fiskasløgunum, toski, hýsu, longu, brosmu, og svartkalva, eru falnir nógv. Hóast koronaprísfallið hevur verið ógvusligt, hevur serstakliga góða ársbyrjanin hildið samlaða úrslitinum uppi, og líkt er til, at endaliga úrslitið helst ikki verður so vánaligt samanborið við onnur ár, tí avreiðingarvirðið fram til september í ár er minkað við sløkum 9% samanborið við prísgongdina frá 2015 - 2019. Góða ársbyrjanin merkti tó, at tað var væntandi, at árið 2020 fór at sláa øll met, og tí er missurin munandi størri, enn tá bert verður samanborið við undanfarin ár.

Trolaraflotin er minni ávirkaður, tí prísurin á upsa, sum er týdningarmesta fiskaslagið, er ikki fallin. Higartil í ár er avreiðingarvirðið sløk 6% lægri enn við vanligari prísgongd.

Í uppsjóvarfiskiskapinum eru prísirnir á svartkjafti eitt sindur hægri enn við vanligari prísgongd, men prísirnir á makreli og sild eru nógv minkaðir. Orsakað av árstíðarviðurskiftum merkir hetta, at uppsjóvarflotin er lítið ávirkaður higartil – avreiðingarvirðið er fyribils minkað 3%. Heldur prísgongdin sær sum higartil, og somu nøgdir verða fiskaðar sum í 2019, verður minkingin í avreiðingarvirðinum eini 5-6 prosent fyri 2020.

**Trekir marknaðir**

Framleiðslan á landi hevur gingið sína vanligu gongd. Marknaðirnir hava tó verið trekari, soleiðis at goymslurnar hava verið størri, enn tær annars høvdu verið. Keypararnir hava ikki vilja bundið seg til at keypa stórar nøgdir, og avbjóðingar hava verið við debitortryggingini hjá keyparunum uttanlands. Hetta hevur verið ein stórur trupulleiki, men tó lata virkini hampiliga væl at í september. Tey sleppa av við fiskin, og prísirnir á nøkrum vørum eru spakuliga farnir uppaftur. Minkingarnar í prísi, sum virkini hava fingið, eru fluttar á veiðiliðið. Tað vil siga, at fiskimaðurin og reiðaríini fáa minni fyri fiskin, og tað er har, neiligu avleiðingarnar vera størstar.

Laksaprísirnir hava eisini verið nógv ávirkaðir í ávís tíðarskeið, og í nøkrum vikum hava teir ligið niður móti framleiðslukostnaðinum, soleiðis at mest sum eingin vinningur hevur staðist av framleiðsluni. Prísfallið hevur ligið um 30 prosent seinastu mánaðirnar, og enn eru eingi greið tekin um, at prísirnir eru batnandi. Fallið í prísunum hevur ikki ført til minkingar í lønargjaldingunum og virkseminum, men heldur tvørturímóti er virksemið økt, við tað at meirvirkingin av laksi er økt.

**Búskapurin minkar á leið 7%**

Samlaðu metingarnar av árinunum av Covid-19 á fiski- og alivinnuna og víðari á aðrar vinnur eru, at føroyski búskapurin av hesum fer at minka við umleið 7 prosentum í ávikavist 2020 og 2021. Í 2022 verður minkingin nakað minni. Havast skal í huga, at hetta ikki er ein framskriving av búskapinum, men einans ein útrokning av teimum árinum, sum Covid-19 hevur á fiski- og alivinnu. Skal ein framskriving gerast av búskapinum, mugu onnur viðurskifti takast við, t.d. árinið á ferðavinnu o.a.

Tað er greitt, at niðurgongdin í prísunum eisini fer at ávirka inntøkurnar hjá landskassa og kommunum. Serliga eru tað inntøkurnar frá felagsskatti og tøkugjaldi, ið fara at minka. Harafturímóti verður ikki roknað við stórvegis minking í inntøkuskatti, MVG og øðrum gjøldum, tí heldur alt virksemið ótarnað fram í vinnuni, fara lønarinntøkurnar ikki at broytast stórvegis orsakað av niðurgongdini.

Samlaðu metingarnar av árinunum av Covid-19 á fiski- og alivinnuna og víðari á aðrar vinnur eru, at føroyski búskapurin av hesum fer at minka við umleið 7 prosentum í ávikavist 2020 og 2021. Í 2022 verður minkingin nakað minni.

**Tørvur á betri hagtølum**

Nøkur viðurskifti eru komin fram í sambandi við kanningina, sum hava stóran týdning fyri møguleikarnar hjá vinnuni at virka í broytiligum umstøðum. Tað var trupult og viðhvørt ógjørligt at fáa samsvar millum hagtøl frá Hagstovu Føroya og Teyggjuni. Databasurnar nýta heldur ikki somu bólkar. (Skipabólkar, reiðskapur, vinnugreinar) og avreiðingar frá teyggjuni vísa ikki, t.d. um talan er um flak ella rundan fisk. Tí er ógjørligt at fáa álítandi prísir fyri summar skipabólkar. Tað er týdningarmikið at hava álítandi hagtøl um okkara høvuðsvinnur fyri at kunna greina gongdina. Tí er okkara tilmæli, at hagtalsframleiðslan verður skipað betri í samstarvi millum tey, sum framleiða og brúka hagtølini.

**Endurskoða tilfeingisgjøld**

Okkara greiningar vístu eisini, at stóri parturin av niðurgongdini liggur hjá restinntøkuni, t.v.s. í feløgunum sjálvum heldur enn hjá lønartakarunum. Hetta merkir, at úrslitið hjá feløgunum verður munandi verri í 2020. Eingin veit at siga, hvussu leingi prísirnir fara at vera lágir, men eitt, sum ávirkar mótstøðuførið hjá fyritøkunum, er, hvussu tilfeingis- og tøkugjøld og skattir annars vera skipað. Okkara prísgreiningar vísa eisini sera stórt sveiggj í prísunum í eitt fimm ára tíðarskeið. Sum dømi kann nevnast tilfeingisgjaldið á makreli - eitt fast gjald, sum er 1,50 kr/kg. Tað merkir, at tilfeingisgjaldið kann sveiggja úr stórum 13 prosentum upp í næstan 40 % av avreiðingarvirðinum. Hetta ger, at tá ið tíðirnar eru ringar, verður goldin ein munandi hægri partur í tilfeingisgjaldi. Gjaldið gongur tí umvent í mun til gongdina í vinnuni, so fyritøkan lutfalsliga skal gjalda mest, tá ið illa stendur til, og minni, tá ið hon hevur ráð at gjalda.

Til sammetingar verður gjaldið í alivinnuni tillagað prísinum, soleiðis at %-parturin, sum verður goldin, eisini er broytiligur. Hetta merkir, at í niðurgongutíðum er lutfalsligi parturin, sum verður goldin, minni bæði í krónum og prosentum.

Stóra niðurgongdin í úrslitinum hjá feløgunum vísir týdningin av einari skynsamari skipan av tilfeingis- og tøkugjøldum fyri at tryggja, at vit framhaldandi hava sterkar fyritøkur, sum megna at standa ímóti brádligum búskaparstoytum, og at tær eisini megna at standa ímóti í drúgvum niðurgongutíðum. Tí er okkara tilmæli at fara undir eina tilgongd at kanna ymiskar hættir at taka inn tilfeingisgjøld og at greina, hvussu teir ymisku hættirnir ávirka mótstøðuførið í vinnulívinum.

**Marknaðaratgongd má betrast**

Tá tað snýr seg um at økja fjølbroytnið í vørum og marknaðum, er marknaðaratgongdin í fleiri førum ein forðing. Eitt dømi kann vera, at høvdu saltfiskavirkini havt kappingarføra atgongd til marknaðir, so sum Brasilia, so høvdu verið størri møguleikar at selt tann vegin, tá ið suðurevropeisku marknaðirnir vóru stongdir í eitt tíðarskeið. Eisini er neyðugt at fáa kappingarføra atgongd til virkaðar fiskavørur, soleiðis at føroyskir framleiðarar kunnu virðisøkja vørurnar meira her heima til endaliga brúkaran. Tí er okkara tilmæli, at myndugleikarnir arbeiða meira miðvíst ímóti at betra um marknaðaratgongdina

hjá føroyskum fiskavørum. Hetta hevði ikki bert gagnað í kreppustøðum, men hevði eisini givið føroyskum fyritøkum fleiri møguleikar at skapa virðir í gerandisdegnum.

**Tilmæli**

- At arbeiða miðvíst fram ímóti betri marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur
- At greina hvussu best er at skipa tilfeingis – og tøkugjøld, og hvussu ymiskir hættir ávirka mótstøðuførið í fyritøkunum
- At skipa hagtalsframleiðsluna betri í samstarvi millum tey, sum framleiða og brúka hagtølini

# Innihaldsyvirlit

**FORMÆLI** 1

**SAMANDRÁTTUR** 2

**INNIHALDSYVIRLIT** 7

**INNLEIÐSLA** 8

**HEIMSBÚSKAPARÚTLIT** 9

**ÁVIRKANIN AV COVID-19 Á VIRKSEMIÐ HJÁ FYRITØKUNUM** 11

**AVBJÓÐINGAR** 12
FISKIVEIÐA 12
FRAMLEIÐSLUGONGDIR 12
GOYMSLA OG LOGISTIKKUR 13
SØLA OG MARKNAÐARVIÐURSKIFTI 14
**TILLAGINGAR OG VIRKSEMIÐ FRAMEFTIR** 15
AVGERÐARGONGDIR 16
**LEIKLUTURIN HJÁ TÍ ALMENNA OG HJÁLPARÁTØK** 16
**MØGULEIKAR** 17

**BÚSKAPARLIGAR AVLEIÐINGAR** 18

ÚTFLUTNINGUR OG PRÍSIR 18
**VIRKISBÚSKAPARLIGAR AVLEIÐINGAR** 21
NAKRAR VIRKISBÚSKAPARLIGAR NIÐURSTØÐUR 25
GREINING AV PRÍSÁRINUM AV COVID-19 26
**FRAMSKRIVINGAR AV PRÍSÁVIRKAN AV COVID-19** 32
**SAMFELAGSBÚSKAPARLIGAR AVLEIÐINGAR** 34

**NIÐURSTØÐUR OG TILMÆLI** 38

**KELDUR** 42

# Innleiðsla

Koronafarsóttin (Covid-19) hevur verið størsta búskaparliga hóttafallið í nýggjari tíð. Minkingin í BTÚ í heimsbúskapinum er meira enn dupult so stór, sum hon var í fíggjarkreppuni í 2009 (World Bank 2020). Ávirkanin er eisini eyðsæð í føroyska búskapinum. Í september 2020 broytti Búskaparráðið útlitini 13,9 prosentstig fyri 2020 - frá einum mettum vøkstri, sum var 7 prosent í várfrágreiðingini, til 6.9 prosent minking í BTÚ samanborið við 2019.

Útlitini broytast alla tíðina, sum farsóttin ferðast millum londini, men seinastu metingarnar hjá OECD (2020) siga, at roknast kann við einari afturgongd í BTÚ í heimsbúskapinum millum 6 og 8 prosent. Afturgongdin í bruttotjóðarúrtøkuni hjá fleiri av stóru útflutningslondum Føroya er væntandi væl størri enn hetta. Koronafarsóttin hevur eisini havt sera álvarsligar fylgjur fyri alskyns viðurskifti kring allan heimin. Matstovur, skúlar og arbeiðspláss hava mestsum ligið still, og flogferðslan minkaði niður í mestsum einki við heili 90 prosentum frá januar til apríl fyri síðani at fara spakuliga uppaftur (Eurocontrol 2020).

Fiskivinnan og alivinnan eru berandi súlurnar undir føroyska búskapinum. Tí hevur virksemið í hesum vinnunum serstakliga stóra ávirkan á føroyska samfelagsbúskapin. Landið fær inntøkur frá hesum vinnunum gjøgnum lønarskatt, partafelagsskatt, kapitalvinningsskatt umframt uppboðssølu-, veiði- og tøkugjøld. Mettu inntøkurnar frá tøku-, uppboðssølu- og veiðigjøldum eru 475 milliónir fyri 2020.

Koronastøðan hevur sjálvandi longu havt - og hevur framhaldandi - ávirkan á fiski- og alifyritøkur. Endamálið við hesari verkætlanini er at skjalprógva og greina, hvørja ávirkan Covid-19 hevur havt á føroyskar ali- og fiskivinnufyritøkur higartil og meta um búskaparligu avleiðingarnar fyri vinnurnar og ávirkanina á samfelagsbúskapin sum heild. Dentur verður lagdur á at lýsa ávirkanina á fyritøkurnar í breiðari merking, t.d. framleiðslugongdir og avgerðargongdir umframt marknaðar- og søluviðurskifti.

**Høvuðsendamálið við verkætlanini er at greina ávirkanina av Covid-19 á føroyska fiski- og alivinnu og avleiðingarnar fyri føroyska búskapin.**

Hetta hevur stóran týdning at skilja, tí føroyski landskassin hevur seinastu árini gjørt seg meira bundnan av inntøkum frá fiski- og alivinnu. Tí hevur gongdin í hesum vinnunum sera stóra ávirkan á landsbúskapin. Stoytir í búskapinum orsakað av broytingum í tilfeingisgrundarlagnum, sum t.d. í kreppuni í 1990´unum ella av ILA-sjúkuni, sum rakti alivinnuna fyrst í hesari øldini, henda við jøvnum millumbilum. Tí er tað av alstórum týdningi at gera eina sokallaða “stress test” av vinnunum og føroyska búskapinum sum heild, fyri at fáa betri innlit í haldførið hjá búskapinum. Hetta kann vera vegleiðandi í sambandi við, hvussu vit umsita inntøkurnar frá hesum vinnunum.

Høvuðsgrundarlagið undir verkætlanini eru samrøður við lyklapersónar og hagtøl frá føroyskum fiski- og alifyritøkum. Afturat hesum eru almenn hagtøl frá t.d. Hagstovu Føroya og Teyggjuni, umframt at hugt verður eftir altjóða hagtølum og frágreiðingum, millum annað frá heimsbankanum, OECD og International Monetary Fund (IMF).

Verkætlanin hevur hesi ítøkiligu endamálini:

- At greina búskaparligu og bygnaðarligu avleiðingarnar av Covid-19 fyri føroyskar fiski- og alifyritøkur gjøgnum samrøður og simuleringar av ymiskum Covid-19 prísstøðum (scenario).

- At lýsa avbjóðingarnar í sambandi við Covid-19 og møguliga ávirkan á avgerðartilgongdina í vinnunum.
- At eyðmerkja møguleikar og at greina, hvussu fyritøkur kunnu gera seg meira mótstøðuførar ímóti brádligum búskaparstoytum.
- At greina, hvørja ávirkan ymiskar støður (scenario) hava á føroyska búskapin, almenna geiran og fólkatalið.
- At gera niðurstøður um, hvørji stig kunnu takast fyri at gera føroyska vinnu og búskapin meira mótstøðufør.

Tað eru nógvar óvissur í sambandi við frágreiðingina. Tað er óvist, nær ella um ein møgulig koppseting verður tøk. Av tí at koronasmittan enn ferðast kring heimin, er trupult at meta um, hvat framtíðin inniber. Fyri at meta um ávirkanina her í 2020, verður ein baseline Covid-19 støða skapt, sum er grundað á samrøður og hagtøl frá fyritøkunum. Hetta skal í størst møguligan mun endurspegla støðuna, sum hon er nú.

Við støði í hesum verða ymiskar "hvat um" støður settar upp. Hesar støðurnar mugu ikki síggjast sum beinleiðis framskrivingar, men sum hugsaðir møguleikar. Hesar støðurnar taka enn eina ferð støði í samrøðum við viðkomandi áhugapartar umframt altjóða metingum um útlitini á ymiskum marknaðum. Hesar hvat-um støðurnar vera síðani brúktar til at meta um avleiðingarnar fyri føroysku bruttotjóðarúrtøkuna og fólkatalið í 2020, 2021 og 2022. Í einari so óvissari støðu kunnu hvat-um støður brúkast til at fáa eina betri fatan av, hvussu Covid-19 kann fara at ávirka føroyska búskapin, alt eftir gongdini.

Í næsta parti viðgera vit útlitini fyri heimsbúskapin, áðrenn vit lýsa ávirkanina á fiski- og alifyritøkur í breiðari merking í triðja parti. Fjórði partur snýr seg um virkis- og samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar fyri vinnurnar og ávirkanina á føroyska búskapin. Í fimta parti draga vit saman um, hvussu ávirkanin hevur verið, hvørjar styrkir og hvørjir veikleikar eru, og hvørji ítøkilig stig kunnu takast fyri at betra um mótstøðuførið í fiski- og alivinnuni, tá ið búskaparstoytir koma fyri.

## Heimsbúskaparútlit

Covid-19 farsóttin hevur havt við sær størstu búskaparliga afturgongdina í heimsbúskapinum í nýggjari tíð, og útlitini fyri búskapirnir kring heimin eru vánalig. IMF (2020) metti í juni í ár, at heimsbúskapurin fer at minka 4,9% í 2020. Covid-19 hevði størri ávirkan á fyrra hálvárið enn væntað, og tí eru útlitini versnaði síðani meting teirra í apríl, tá IMF metti, at BTÚ fyri heimsbúskapin fór at minka 3%.

OECD hevur eisini gjørt metingar um ávirkanina á heimsbúskapin. Í juni gav stovnurin út metingar sínar við tveimum hugsaðum støðum. Fyrra støðan, har ið bert ein bylgja var, og so hin støðan íroknað eina eyka broyting, um ein onnur bylgja kom í seinnu hálvu av 2020. Stovnurin metti sannlíkindini vera líka fyri báðar støðurnar. Har meta tey, at búskaparliga ávirkanin á heimsbúskapin fer at vera - 6% fyri eina bylgju og sløk - 8%, um vit fara síggja eina stóra bylgju afturat, har ið samfeløg mugu lata aftur. Sigast má tó, at óvissurnar sjálvt fyri 2020 eru sera stórar, tí torført er at meta um, hvussu einstøku londini klára at tálma smittuni og halda búskapin í gongd.




*Mynd 1: Væntað broyting í BTÚ fyri týdningaramiklastu (í virði) útflutningsmarknaðirnar hjá Føroyum og allan heimin. Londini eru raðfest eftir útflutningsvirðinum. Kelda: OECD Economic Outlook. Juni 2020*

Tá ið tað kemur til føroyska sjónarhornið, er helst meira viðkomandi at hyggja eftir londunum, Føroyar útflyta mest til, heldur enn at hyggja eftir bruttotjóðarúrtøkuni fyri heimin sum heild. Mynd 1 vísir, at ein minking í BTÚ er væntandi fyri øll londini í 2020. Londini á myndini umboða sløk 83 prosent av føroyska útflutninginum í 2019 (Hagstova Føroya 2020). Londini, ið væntandi verða harðast rakt, eru Bretland, Spania og Italia, har afturgongdin í BTÚ í besta føri verður 11 prosent. Um ein seinna bylgja kemur, verður minkingin væntandi umleið 14 prosent. Metingin vísir, at Russland, sum var nógv tann størsti keyparin av føroyskum fiskavørum í 2019 (23 prosent av virðinum), fer at hava eina minking í BTÚ millum - 8 og - 10% samanborið við 2019. Útflutningurin til Danmark, USA, Bretland og Kina er á leið líka stórur, tá hugt verður eftir virðunum, og hesi londini umboða sløk 40 prosent av samlaða føroyska útflutningsvirðinum. Av hesum londunum er Kina minst rakt, tí har minkar BTÚ ávikavist - 2,5 prosent og - 3,7 prosent samanborið við í 2019. Bretland nógv harðast rakt, meðan minkingin í BTÚ í Danmark í besta føri liggur um - 6 prosent, sum er umleið á sama støði sum fyri heimsbúskapin.

Hesi útlit vísa okkum, at búskapirnir í fleiri av londunum, sum Føroyar útflyta fiskavørur til, fara at verða álvarsliga raktir av Covid-19, og hetta fer sannlíkt at ávirka útflutningin til hesi londini.

Væntast kann, at ein slík búskaparlig afturgongd fer serliga at raka tær fyritøkur, sum útflyta fiskavørur til matstovur, gistingarhús og líknandi, tí júst hesin marknaðurin er nógv ávirkaður av Covid-19 tiltøkunum, ið skulu minka um smittuspjaðing. Hugsa vit um feskan fisk og saltfisk, so eru útlitini á teimum marknaðunum vánalig fyri 2020 og væntandi eisini inn í 2021 (GlobeFish 2020a).

Harafturat kann sigast, at útlitini broytast alla tíðina. OECD er komin við einari nýggjari meting í september 2020, har ið tey hava broytt metingina nakað uppeftir. Tey meta nú, at BTÚ fyri heimin í 3. ársfjórðingi 2021 kann koma upp aftur á stigið, tað var í endanum av 2019. OECD (Interim report, september 2020) ávarar tó, at í flestu búskapunum verður framleiðslan síðst í 2021 lægri enn síðst í 2019, og tískil er vandi fyri einari varandi ávirkan á búskapirnar.




*Mynd 2: Broyting í BTÚ fyri heimin í mun til fjórða ársfjórðing 2019. Kelda og mynd: OECD Interim Economic Outlook, september 2020*

Sambært september-metingini hjá OECD fyri einstøk lond í 2021, so vænta tey, at BTÚ minkar 6% í Russlandi, 7,8% í Bretlandi og 6,4% í Italia samanborið við 2019. Hetta merkir, at fleiri búskapir í okkara høvuðsmarknaðarlondum als ikki koma upp aftur á 2019-stigið í 2021. Hinvegin verður mett, at vøksturin í Kina verður 8,2 prosent í 2021. Hetta er tí, at Kina verður roknað sum ein skjótt vaksandi búskapur (emerging economy). USA fer væntandi eisini at røkka 2019-støðið í fjórða ársfjórðingi í 2021.

Vit hava her greitt eitt sindur frá útlitunum fyri heimsbúskapin og tey lond, Føroyar útflyta mest til. Næsti partur snýr seg um, hvussu fiski- og alifyritøkurnar eru ávirkaðar av Covid-19 farsóttini.

# Ávirkanin av Covid-19 á virksemið hjá fyritøkunum

Í hesum partinum verður greitt frá, hvussu Covid-19 hevur ávirkað virksemið hjá fyritøkunum. Allar niðurstøðurnar í hesum partinum av verkætlanini eru grundaðar á samrøður við lyklapersónar í føroyskum fiski- og alifyritøkum. Hetta gevur okkum eitt innlit í, hvussu Covid-19 hevur ávirkað sølu- og marknaðarviðurskifti, framleiðslugongdir, avgerðargongdir og onnur viðkomandi viðurskifti, sum hava týdning fyri fyritøkurnar, og eisini hvussu mótstøðuførar og fleksiblar fyritøkurnar hava víst seg at vera. At enda gera vit nakrar eygleiðingar og fyribils niðurstøður um, hvørjar orsøkirnar til hetta kunnu vera.

Tað er týdningarmikið at hava í huga, at støðan við Covid-19 broytist allatíðina. Flestu samrøðurnar eru gjørdar í mai og juni, og síðan tá hevur verið ein munandi øking í Covid-19 tilburðum, soleiðis at fleiri marknaðir hava stongt eitt sindur aftur. Fyri at fáa eina meira dagførda mynd hava vit fylgt upp aftur upp á nøkur viðurskifti, síðan samrøðurnar vórðu gjørdar. Felags fyri nógvar av fyritøkunum var, at tær mettu, at árstíðin, sum korona brast á, var heppin, t.d. var tað gott, at makrel- og sildavertíðin var av, og at tað var lágárstíð fyri saltfisk í Spania og Italia. Hetta merkir tó eisini, at ávirkanin á hetta virksemið kann gerast størri út á heystið, um korona enn ger seg galdandi nú í seinnu helvt av 2020.

## Avbjóðingar

### Fiskiveiða

Fiskiveiðan sjálv er sum heild ikki nógv ávirkað av Covid-19. Tó var eitt stutt tíðarskeið í fyrstuni, tá prísurin fall, at nøkur línuskip og útróðrarbátar gjørdu av ikki at fara út. Prísurin fyri fleiri fiskasløg fall í mars, meðan fleiri marknaðir vóru stongdir. Fleiri nevndu eisini, at Covid-19 er komið oman á aðrar óhepnar faktorar, sum ikki eru beinleiðis tengdir at farsóttini, men sum kortini hava havt negativa búskaparliga ávirkan. M.a. var ringt veður í januar og februar atvoldin til, at fleiri útróðrarmenn hildu seg aftur at fara til útróðrar, og var veiðan minni tað tíðarskeiðið. Harafturat var vánalig úrtøka orsakað av slánum í botnfiskaveiðuni.

"Tíbetur hava vit slettis ikki verið rakt av Covid-19 í reiðarínum. Støðan kundi verið sera álvarsom, um vit fingu sjúkuna umborð"

Tá talan er um uppsjóvarfiskiskapin, nevndu fleiri, at tað var heppið, at Covid-19 kom á vári heldur enn seinni út á summarið og heystið, orsakað av vertíðini fyri makrel og sild. Hetta merkir, at tann fiskiskapurin var ikki so nógv ávirkaður av farsóttini í fyrstu syftu, meðan skipini hava fiskað svartkjaft. Prísurin á svartkjafti er hækkaður í tíðarskeiðnum.

Tó eru mannagongdir broyttar umborð. Øll reiðaríini hava roynt at avmarka manningarskiftini og hava ikki lovað tænastuveitarum og gestum umborð. Umframt hetta hevur manningin heima verið biðin um at vera í sóttarhaldi 2 vikur, áðrenn teir skuldu við. Tískil kann sigast, at Covid-19 hevur ávirkað manningina persónliga, soleiðis at teir hava havt minni frælsi, tá teir hava verið heima. Tíbetur hava eingi av reiðaríunum, sum vit hava tosað við, verið rakt av Covid-19.

### Framleiðslugongdir

Fleiri nevndu óvissurnar um mannagongdir, tá Covid-19 rakti Føroyar fyrst í mars. Tó var hendan óvissan helst minni í fiski- og alivinnuni enn aðrastaðni í samfelagnum. Ein orsøk til hetta kann vera, at fiski- og alivinnan virka við matvørum, og tískil eru sera strong krøv til hesar vinnur viðvíkjandi mannagongdum og reinføri. Sigast skal, at serliga alifyritøkurnar, sum eru vanar við smittufyribyrging og sóttreinsan í framleiðsluni, vóru skjótari enn myndugleikarnir at gera mannagongdir viðvíkjandi sóttreinsan, at býta starvsfólk í bólkar og avmarka vitjanir uttanífrá. Tær høvdu longu sett átøk í verk, tá ið løgmaður boðaði frá, at landið skuldi niður í ferð. Fiskivinnufyritøkurnar vóru eisini sera skjótar at gera neyðugu tillagingarnar, soleiðis at framleiðslan hevur koyrt sum ætlað. Allar fyritøkurnar settu eisini beinanvegin avmarkingar, soleiðis at fólk, sum høvdu verið uttanlands ella havt samband við onkran, sum er komin uttanífrá, ikki sluppu til arbeiðis, fyrr enn tey høvdu verið í sóttarhaldi.

Serliga alifyritøkurnar, sum eru vanar við smittufyribyrging og sóttreinsan í framleiðsluni, vóru skjótari enn myndugleikarnir at gera mannagongdir viðvíkjandi sóttreinsan, at býta starvsfólk í bólkar og avmarka vitjanir uttanífrá.

Onkur vísti á, at ein meira jalig ávirkan av Covid-19 er ein økt tilvitan um týdningin av sóttreinsan og reinføri yvirhøvur, serliga umborð á skipunum. Á virkjunum eru longu strangari krøv, soleiðis at hetta ikki hevur havt ta stóru ávirkanina á mannagongdirnar har.

Sosiala samveran er ávirkað, av tí at starvsfólkini hava verið býtt upp í toymir fyri at minka um smittuvandan. Eisini hava flestu fyritøkur avmarkað ella bannað vitjanir uttanífrá, meðan Covid-19 støðan var ringast. Síðani er latið nakað upp aftur, tó so at enn eru avmarkingar fyri vitjandi, serliga á skipunum.

Nakrar fyritøkur hava tikið stig til at testa starvsfólkini fyri at tryggja, at smittan ikki fer at gera um seg á virkjunum. Onkrar fyritøkur hava gjørt avtalu við privatar kanningarstovur, meðan aðrar hava gjørt íløgu í potingarútgerð. "Tað er sera hent hjá okkum at kunna testa starvsfólk á staðnum, so skjótt sum okkurt ivamál er". Hetta ger, at framleiðslan kann fara fram nøkulunda sum vanligt undir tryggum viðurskiftum. Nakrir virkisleiðarar halda, at heldur enn at stongja Føroyar innanhýsis, áttu krøvini um komu til Føroya at verið strangari. "Tað hevur verið hugsað ov nógv um ferðavinnuna, og hvussu Covid-19 hevur ávirkað har. Fólk í samfelagnum geva sær ikki far um, at kemur smittan inn í høvuðsvinnuna, so steðgar alt upp, tí virkini muga stongja. Og hvør skal gjalda tað?"

> "Fólk í samfelagnum geva sær ikki far um, at kemur smittan inn í høvuðsvinnuna, so steðgar alt upp, tí virkini muga stongja. Og hvør skal gjalda tað?"

Sambært fyritøkunum hevur Covid-19 antin havt onga ella eina lítla jaliga ávirkan á effektivitetin. Fleiri møguligar orsøkir kunnu vera til hetta. T.d. er minni sosialisering og eitt økt fokus á at arbeiða meira talgilt. Orsakað av versnandi rakstrarúrsliti eru summar fyritøkur farnar at brúka meira hagtøl úr framleiðsluni og at endurskoða kostnaðir fyri at optimera framleiðslukostnaðir. Eisini eru fleiri fyritøkur farnar at leggja størri dent á støðisútrokningar fyri at vita, hvussu mest fæst fyri rávøruna undir umstøðunum.

Undantaksstøðan, tá tað snýr seg um vitjandi, gjørdi, at í eitt stutt tíðarskeið vóru feløg í nøkrum førum undantikin eftirliti av t.d. djóravælferð. Slík undantøk - um tey hildu fram - kundu havt við sær eina heilsukreppu við stórum búskaparligum avleiðingum. Hetta var tó bert í eitt stutt tíðarskeið, tá Covid-19 byrjaði, og hevur síðani rættað seg uppaftur.

Sum heild hava samrøðurnar, sum vit hava havt, verið á leiðslustigi. Tí er ringt at meta um, hvørja ávirkan Covid-19 hevur havt á starvsfólk og manningar. Tað er tó eyðsæð, at tað sosiala er nógv ávirkað, bæði á arbeiðsplássinum og heima. Ikki er møguligt at hitta uttanhýsis veitarar ella vitjandi, og kaffiprát tvørtur um fyritøkuna hevur heldur ikki verið møguligt. Eisini hava sjómenn verið bidnir um at isolera seg, meðan teir eru heima. Hóast starvsfólk sum heild skilja støðuna, so kann hetta ávirka sálarligu støðuna. Harafturat eru nøkur starvsfólk, sum hava kent seg ótrygg bæði á arbeiðsplássinum og yvirhøvur, serliga um tey hava onkran nærstandandi, sum er í vandabólkinum ella arbeiðir á heilsuøkinum.

## Goymsla og logistikkur

Ein trupulleiki, sum serliga merkti fyritøkurnar tíðliga í Covid-19 tíðarskeiðnum, var stóra fallið í eftirspurninginum av fiskavørum umframt logistiskar avbjóðingar. Onkur virkir, t.d. í botnfiskavinnuni, lógu still, og tey flestu sluppu í eitt tíðarskeið mestsum ikki á høvuðsmarknaðirnar við vørum sínum. Italia og Spania, sum eru tveir av høvuðsmarknaðunum fyri saltfisk, vóru bæði sera hart rakt av Covid-19, og hetta hevur havt stóra ávirkan á hesi virkini, tí tey ikki hava fingið selt. Ein avleidd avbjóðing hjá hesum fyritøkunum var at fíggja stóru goymsluvirðini.

Eisini hevur verið trupult hjá uppsjóvarvirkjunum at sleppa av við goymslurnar av makreli og sild, sum tey vanliga selja ígjøgnum árið. Nakrar av størru fyritøkunum hava spakuliga selt av goymsluni ígjøgnum seinastu mánaðirnar, meðan ein fyritøka, vit hava tosað við, avgjørdi at selja alla goymsluna beinanvegin fyri at sleppa undan stóra váðanum at brenna inni við einari stórari goymslu. Eisini var eitt stutt tíðarskeið, har trupult var at fáa goymslupláss bæði í Føroyum og uttanlands. Hetta ávirkaði eisini prísin á goymsluplássi nakað. Flutningurin inn til Italia var serstakliga trupul í fyrstuni, av tí at bilførarar máttu í sóttarhald, tá teir komu út aftur úr Italia. Hetta hevur tó lagað seg seinni. Eisini hevur flutningurin til Kina verið nakað darvaður. Bingjur hava ofta verið standandi í fleiri vikur, áðrenn tær eru fluttar víðari til endaliga marknaðin í Kina. Annars hevur flutningurin gingið væl til flest aðrar marknaðir í seinastuni.

> Fleiri fyritøkur nevna týdningin av at hava so lítla goymsluføring sum gjørligt. "Vit hava lært av hesum. Vit fara at royna at hava eina so lítla goymslu sum møguligt til alla tíð fyri at sleppa undan váðanum, um hetta skuldi hent aftur".

## Søla og marknaðarviðurskifti

Tá ið londini rundan um okkum lata aftur við tilmælum um at vera innandura, so er ein ávirkan, at íbúgvarnir eta meira heima. Sonevnda HORECA-segmentið,' sum er gistingarhús, matstovur og kaffistovur, verður sjálvandi hart rakt, av tí at fólk ikki fara út at eta ella ferðast. Úrslitið er, at eftirspurningurin frá hesum segmentinum minkar ógvusliga, og at eftirspurninginum á smásølu/sølumiðstøðamarknaðunum økist. Hetta hevur sjálvandi ávirkað útflutningin av føroyskum fiskavørum. Eitt gott dømi um, hvussu fyritøkur hava umstillað seg til broyttu marknaðarstøðuna, er portións-framleiðslan hjá Bakkafrost. Eftirspurningurin eftir laksaportiónum er farin so nógv upp, at tey ikki hava klárað at framleitt alt, sum keypararnir spyrja eftir. Eisini hevur minkaði eftirspurningin frá HORECA-segmentinum ávirkað útflutningin av saltfiski, t.d. er eitt annað atlit nú, at fiskurin ikki má vera ov stórur, tí at annars verður flakið ov dýrt hjá húsarhaldunum at keypa. Eitt annað virki, sum fæst nógv við upsaframleiðslu, ið verður nógv brúkt í catering-segmentinum, skúlum, og kantinum, vísti eisini á, at tað var týdningarmikið at kunna umstilla seg, nú eftirspurningurin á tí marknaðinum mestsum var burtur. T.d. kundu tey lagt størri dent á smásølu (retail), men tað krevur eitt heilt annað set-up. Tað hevði tó verið ein styrki undir hesum umstøðunum, at mann hevði fleiri segment at selja til.

> Virkini hava lagað seg til broyttu støðuna úti á marknaðinum, soleiðis at prísfallið nú er flutt til veiðiliðið. "Tann, sum verður taparin í øllum hesum, er fiskimaðurin"

Tá tað kemur til sølu og marknaðarviðurskifti, so er týdningarmikið at leggja til merkis, at Covid-19 smittan ikki hevur rakt londini um somu tíð. Fyrst vórðu kinesiski og asiatisku marknaðirnir raktir, síðani Evropa og so Norðuramerika. Hetta hevur merkt, at tær fyritøkurnar, sum selja til hesi londini, alla tíðina hava kunnað selt onkrastaðni. Alivinnan var tann fyrsta, sum merkti til avleiðingarnar av Covid-19, við at Kina lat aftur í januar/februar mánaða, og harvið fór útflutningurin til Kina mestsum niður í einki. Hetta merkist øgiliga væl beinanvegin. Men tá Kina lat upp aftur í marts mánaða, lat Evropa aftur. Tað hevði við sær, at útflutningurin til Kina vaks aftur, men minkaði í Evropa, tá talan var um laks til hotell- og matstovuvinnuna.

Tað ávirkaði eisini marknaðin, at aðrar fiskivinnutjóðir knappliga sendu nógva vøru á teir somu marknaðirnar. Eitt dømi var, at útboðið av fiski í Evropa bleiv ov stórt, prísurin fór niður, og viðhvørt var ringt at sleppa av við fiskin. Hetta gjørdi, at framleitt varð meira inn á goymslu enn vanligt. Ein onnur avbjóðing hjá fyritøkunum var, at keyparar, sum virkini høvdu langtíðaravtalur við, knappliga kravdu at endurskoða avtalurnar fyri at lækka prísirnar. Her høvdu virkini einki val, tí hin møguleikin

var, at keypararnir lupu frá allari keypsavtaluni. Hetta hevur serliga gjørt seg galdandi fyri londini í Suðurevropa, sum vóru hart rakt (t.d. Spania, Italia og Frakland).

Tað er munur á, hvussu fyritøkurnar eru skipaðar, og hetta hevur ávirkan á teirra mótstøðuføri, tá ógvuligir prísstoytir henda, sum við Covid-19. Summar fyritøkur eru vertikalt integreraðar, og hetta ger tað møguligt hjá teimum at fáa smidligari og bíligari fígging av goymsluni. Hetta sæst eisini í atburðinum hjá fyritøkunum. Aðrar hava selt skjótari av goymsluni til ein verri prís, tí tær høvdu ikki møguleika fyri at sita og bíða við einum so stórum váða. Tá ið Covid-19 byrjaði, og óvissan var stór, avgjørdi Hiddenfjord eisini at økja tøkuna meira enn upprunaliga ætlað fyri at tryggja, at tey sluppu av við fiskin.

> “Framleiðslan er sum so ikki ávirkað av korona, men er marknaðurin úti í heimi ikki har, so verður verri”

Fleiri fyritøkur nevna, at teirra virksemi sum so ikki er beinleiðis rakt av sjálvari Covid-19, tí framleiðslan hevur kunnað hildið fram sum vanligt, men tað er støðan úti á marknaðinum, sum hevur neiligar avleiðingar. Fallandi eftirspurningur hevur havt við sær minni sølu bæði í virði og nøgd. Flestu fyritøkurnar hava tó klárað hampiliga væl at tillaga sítt virksemi, annaðhvørt við lækkandi rávøruprísi og søluprísi ella við at flyta seg inn á onnur segment (aðrar marknaðir, annað slag av framleiðslu).

Ein trupulleiki, sum hevur ávirkað søluna nógv, er at fleiri keyparar uttanlands mistu debitortryggingina. Vanliga selja virkini ikki, um keyparin onga trygging hevur, uttan so at keyparin kann gjalda beinanveg. Tað kann hann vanliga ikki, tá talan er um stórar upphæddir. Ein onnur ávirkan er, at ongar stórar avtalur eru gjørdar, av tí at støðan er so óviss, og keypararnir ikki tora at binda seg. Harafturat var fiskivinnustevnan í Brússel avlýst, og hetta hevur ikki gjørt støðuna betri, tí har verða vanliga nógvar avtalur gjørdar.

Spurdar um framtíðarútlitini nevna allar fyritøkurnar, at sera stór óvissa ger seg galdandi, so tað er sera trupult at meta um. Tó siga allar seg vænta, at 2021 verður eisini nógv ávirkað. Fleiri vænta heldur ikki, at viðurskiftini vera vanlig aftur í 2022. Vit vita sjálvandi ikki, hvussu londini, vit útflyta til, fara at klára at handfara smittuna, og nær ella um eitt effektivt koppingarevni verður tøkt. Støðan við Covid-19 kemur sjálvandi aftrat stóru óvissunum, sum eru ein meira natúrligur partur av fiski- og alivinnuni. Umframt grundleggjandi týdningin av rávørugrundarlagnum, so ávirka oljuprísurin og amerikanski dollarin eisini fiskaprísir og kostnaðir, og hesir eru helst eisini í ávísan mun tengdir at Covid-19. Ein lágur oljuprísur hevur tó sjálvandi eina jaliga ávirkan á úrslitini hjá fyritøkunum, serliga hjá reiðaríunum, har brennievni er so stórur partur av útreiðslunum. Tær fyritøkurnar, sum útflyta til stóru oljuframleiðaralondini, verða eisini negativt ávirkaðar orsakað av minkandi keypiorku í hesum londunum. Eisini hevur lága, norska gjaldoyrað neiliga ávirkan á kappingarførið hjá føroyskum fiski.

> Støðan við Covid-19 kemur sjálvandi aftrat stóru óvissunum, sum eru ein meira natúrligur partur av fiski- og alivinnuni. Umframt grundleggjandi týdningin av rávørugrundarlagum, so ávirka oljuprísurin og amerikanski dollarin eisini fiskaprísir og rakstur og eru helst eisini í ávísan mun tengdir at Covid-19.

## Tillagingar og virksemið frameftir

Hendan óvanliga Covid-19 støðan og upplivingarnar hjá nøkrum av okkara størstu fyritøkum kunnu læra okkum nógv um, hvat vit gera gott í Føroyum, og hvar tað er neyðugt at bøta um viðurskiftini.

Tá fyritøkurnar vera spurdar, um Covid-19 hevur havt ávirkan á íløguætlanir, so nevna tær flestu, at tað annaðhvørt ikki hevur havt ávirkan ella eina lítla ávirkan. Tó hevur onkur einstøk fyritøka nevnt, at tey steðga við øllum íløgum, sum ikki longu eru byrjaðar, fyri at síggja, hvussu leikur fer. Tó so, ger fyritøkan alt arbeiði liðugt, sum er í gongd. Tað hava eisini verið logistiskir trupulleikar viðvíkjandi íløgum, tí at amboð, maskinur ella montørar ikki komu til landið, ella starvsfólk á virkjum uttanlands vóru heimsend orsakað av Covid-19. Ein fyritøka nevndi, at summar íløgur vóru seinkaðar, tí nevndin ikki hevði fingið møguleika at møtast og tosa saman um hetta. "Hóast onkrir fundir hava verið á Zoom ella Teams, so er neyðugt at hyggja hvør annan í eyguni, tá størri avgerðir skulu takast."

Sum heild verða ætlaðar íløgur gjørdar, men av tí at møguleikarnir fyri fysiskum fundarvirksemi hava verið avmarkaðir, so eru fleiri íløgur útsettar. "Hóast fundir hava verið á Zoom ella Teams, so er neyðugt at hyggja hvør annan í eyguni, tá størri avgerðir skulu takast".

### Avgerðargongdir

Tað er týdningarmikið at nevna, at fyritøkurnar, harav tær flestu hava nógvar royndir á baki, eru vanar við stór sveiggj bæði í prísum og rávørugrundarlagi. Tær eru sostatt fleksiblar og hava umstillingarevni til nýggjar og broytandi støður. Hetta merkist væl í prátunum við persónarnar, sum ikki virka so nervaðir av støðuni, hóast hon er trupul. Ein virkisleiðari nevndi, at prísfallið er enn ikki helvtina so stórt, sum tey upplivdu undir fíggjarkreppuni. "Vit eru vanir við broytingar á marknaðinum og at leypa frá steini til stein".

Covid-19 hevur sum útgangsstøði ikki ávirkað sjálva avgerðartilgongdina í teimum ymsu fyritøkunum, sum hava verið við í hesari verkætlan. Fyritøkurnar eru ymsar í vavi og stødd, og tískil er tað ymiskt, hvørjar mannagongdir ymsu fyritøkurnar hava viðvíkjandi avgerðartilgongd. Í summum førum er tað stjórin, sum tekur avgerðina, og í øðrum førum eru avgerðirnar lutaðar út til deildarleiðarar og/ella einstøk starvsfólk á teimum ymsu økjunum.

Fleiri av fyritøkunum nevna tó, at ein slík kreppustøða hevur við sær, at mann verður neyvari í sínari tilgongd og brúkar meira orku uppá at eftirkanna, hvat ítøkiliga loysir seg best at gera. Eisini hevur ein av alifyritøkunum gjørt av at leggja stóran dent á at endurskoða allar prosessir fyri at minka um kostnaðarstøðið, nú tá prísirnir í tvey stutt tíðarskeið hava ligið rundan um framleiðslukostnaðin.

At talan hevur verið um ein alheims kreppustøðu, sum hevur fingið nógva rúmd bæði innanhýsis og uttanhýsis, hevur eisini havt ávirkan á fleiri starvsfólk. Summi hava kent allar reglurnar og økta fokusið á smittufyribyrging sum eitt stórt inntriv í gerandisdagin, og hetta hevur eisini skapt ótryggleika millum fleiri. Fleiri fyritøkur nevna tí, at tær hava lagt meira orku í at leggja samskiftið við starvsfólkini betri til rættis og hava sjálvar lært nakað í prosessini, sum kann gagna í komandi kreppustøðum eins og í gerandisdegnum.

Eisini vænta fyritøkurnar, at økta fokusið á sóttreinsan og reinføri yvirhøvur fer at halda fram, eisini aftaná at Covid-19 farsóttin er farin afturum.

## Leikluturin hjá tí almenna og hjálparátøk

Fyritøkurnar hava ymsar meiningar um almennu tiltøkini, sum eru framd í sambandi við Covid-19 farsóttina. Flestu fyritøkur er tó samdar um, at tað er ein alheimskreppa, og at tað er neyðugt at laga seg til umstøðurnar.

Sum heild halda fyritøkurnar, at myndugleikarnir hava klárað tað væl og rósa góðu tilbúgvingini viðvíkjandi kanningum og smittusporan. Hendan sterka tilbúgvingin hevur gjørt, at vit hava kunnað havt framleiðsluna í gongd mestsum uttan steðg.

Tað almenna hevur eisini sett nøkur átøk í verk fyri at minka um búskaparligu avleiðingarnar av Covid-19 her heima. Mest viðkomandi at nevna her eru lønarískoyti til heimsend starvsfólk og sjálvstøðugt vinnurekandi, víðkan av dagpeningaskipanini til at fevna um tilmælt sóttarhald, útsetan av MVG-avrokning og gjaldsfreistum av tollkreditti og stuðul til fastar útreiðslur fyri serliga hart raktar fyritøkur. Umframt hetta kunnu hart raktar fyritøkur fáa atgongd til veðhaldsskipanir frá Danmarks Eksportkredit og Vækstfonden.

> Sterka tilbúgvingin við kanningum og smittusporan hevur gjørt, at tað hevur verið møguligt at havt framleiðsluna koyrandi mestsum uttan steðg.

Tær allarflestu fyritøkurnar, vit hava tosað við, hava mest sum ikki brúkt hjálparpakkarnar. Tey, sum hava brúkt hjálparpakkar, gjørdu hetta serliga vegna smittuvandan. T.d. við at senda starvsfólk í hesa skipanina, tí hesi høvdu familju, sum kom heim úr útlandinum. Á tann hátt vildu hesar fyritøkur tryggja sær, at starvsfólkini ikki tóku møguliga smittu inn á arbeiðsplássið. Okkurt virki hevur ligið stilt í 3 vikur, men hesi nevndu eisini, at tey hava jú fiskavirkisskipanina, sum hevur sama endamál sum heimsendingarhjálparpakkin. Tó fáa starvsfólkini heldur betri sømdir við hjálparpakkanum.

Ongir av persónunum, vit hava tosað við, hava havt eitt ítøkiligt ynski um okkurt annað alment hjálparátak. Onkrar fyritøkur nevndu tó møguleikan at fáa lættari atgongd til goymslufígging og at betra um gjaldførið. Hesin tørvurin fer at økjast, um støðan úti á marknaðinum ikki batnar skjótt. Tó vóru fleiri, sum undraðust á, at tað hevði verið so lítil áhugi frá myndugleikunum. Tey høvdu væntað eina uppringing frá t.d. fyrisitingini, landsstýris- ella løgtingsfólki, meðan arbeitt varð við hjálparpakkunum fyri at eyðmerkja, hvat tørvurin var. Summar fyritøkur, sum hava deildir í øðrum londum, nevndu, at tey har hava fingið bæði brøv og uppringingar frá myndugleikunum, har fregnast varð, hvussu støðan var í fyritøkunum, og hvat teimum tørvaði. Sigast skal tó, at myndugleikarnir vóru í sambandi við Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum hevði lagt nógva orku í at seta seg inn í og lýsa støðuna hjá ymisku fyritøkunum kring landið.

Eitt meira breitt ynski var eitt meira miðvíst arbeiði at betra um marknaðaratgongdina, soleiðis at tað eru fleiri møguleikar, tá marknaðir stongja, ella prísirnir lækka. Hetta hevði gagnað bæði í gerandisdegnum, men sanniliga eisini, tá ið kreppustøður koma fyri.

## Møguleikar

Tað eru eisini møguleikar at hóma í Covid-19 støðuni. Sølan til aðrar marknaðir enn teir vanligu kann skapa nýggjar møguleikar fyri onkrum varandi. Støðan hevur eisini fingið okkum at hugsa um aðrar marknaðarmøguleikar. Ein virkisleiðari nevndi, at hetta kundi verið høvi til at ment framleiðsluna meira til smásølu (retail) heldur enn matveitingar (catering). Tað krevur eitt heilt annað set-up, og at vit gera nakrar íløgur, men tað hevði givið okkum meira fleksibilitet, tá slíkar støður koma fyri. Eisini í alingini

> "Tað er týdningarmikið ikki at lata eina kreppu fara til spillis. Vit hava endurskoðað allar framleiðslugongdir fyri at minka um kostnaðarstøðið og harvið framleiðslukostnaðin".

hevur Bakkafrost lagt seg eftir at økja framleiðsluna av laksaportiónum, sum verða seldar í smásølu til húsarhald, heldur enn heilan laks til matstovur og matveitingarstøð. Eisini hevur vánaligi prísurin gjørt, at allar framleiðslugongdir eru endurskoðaðar, og soleiðis er framleiðslukostnaðurin minkaður hjá fleiri fyritøkum.

## Búskaparligar avleiðingar

Í mars 2020 metti Búskaparráðið, at vøksturin í BTÚ í ár fór at vera umleið 7%. Í september broytti Búskaparráðið metingina til 6,9 prosent minking í BTÚ. Broytingin er 14 prosentstig í einum 6 mánaða tíðarskeiði. Tó metir Búskaparráðið (2020), at talan er her um eina sonevnda 'V' støðu. Tað vil siga, at Covid-19 er ein ógvusligur stoytur, men sum føroyski búskapurin kemur skjótt burturúr aftur. Sambært Mynd 3 meta tey, at BTÚ økist aftur í 2021 til 5,5% í mun til 2020, t.v.s. at búskapurin ikki kemur heilt upp á 2019-stigið, men nærkast støðuni áðrenn Covid-19.




*Mynd 3: Meting av BTÚ-vøkstri í leypandi prísum (BTÚ er uppgjørt til og við 2018. 2019 – 2021 eru metingar hjá Búskaparráðnum). Kelda og mynd: Búskaparráðið 2020.*

Tað er sera torført, um ikki ógjørligt, at spáa um gongdina komandi mánaðirnar og árini, men føroyski búskapurin er sera bundin at gongdini í øðrum londum, sum vit útflyta til. Samrøður, vit hava havt við lyklapersónar í føroyskum fiski- og alifyritøkum, umframt metingar úr altjóða frágreiðingum, gera tó, at metingarnar her ikki verða eins bjartskygdar. Munurin er, at vit í hesari frágreiðingini meta um ávirkanina á fiski- og alivinnuna og haðani á restina av búskapinum, meðan Búskaparráðið metir um allar avleiðingarnar fyri búskapin, t.d. ferðavinnuna. Væntast kann tí, at úrslitið av metingunum hjá Búskaparráðnum fer at vísa eina størri niðurgongd enn okkara metingar.

### Útflutningur og prísir

Tøl frá Hagstovuni vísa á, at virðið á fiskavøruútflutninginum er minkað 10% frá januar til juli 2020 samanborið við sama tíðarskeið í fjør (Talva 1). Verður sæð burtur frá stóru minkingini í útflutninginum av slógvi og fiskaúrdráttum (71%), hevur útflutningsvirðið á toski fingið dyggasta smeitin, tí tað er minkað 25%. Útflutningsvirðið á svartkalva og hýsu er eisini minkað 15%. Makrelurin er minkaður 8%, men her er vert at nevna, at vertíðin fyri makrel er ikki fyrr enn á heysti og vetri. Tó verður nakað av

makreli útflutt ígjøgnum alt árið. Laksurin, sum umboðar næstan helmingin av fiskavøruútflutningsvirðinum, er minkaður 7%.

**Vøruútflutningur í virði skiftur á høvuðsvørubólkar**
Januar-juli 2019 og 2020, í mió. kr.

| | Januar-juli | | Munur | |
|---|---|---|---|---|
| | 2019 | 2020 | í mió. kr. | í % |
| **Útflutningur tilsamans** | **5.061** | **4.577** | **-484** | **-10** |
| Fiskavøruútflutningurin tilsamans | 4.750 | 4.292 | -458 | -10 |
| Toskur | 720 | 540 | -180 | -25 |
| Upsi | 163 | 151 | -12 | -7 |
| Hýsa | 109 | 95 | -14 | -13 |
| Makrelur | 493 | 466 | -26 | -5 |
| Sild | 195 | 199 | 4 | 2 |
| Svartkjaftur | 90 | 99 | 9 | 10 |
| Svartkalvi | 58 | 49 | -9 | -15 |
| Laksur | 2.160 | 2.017 | -143 | -7 |
| Slógv og fiskaúrdráttir | 115 | 33 | -82 | -71 |
| Annar fiskur | 649 | 643 | -6 | -1 |
| Aðrar vørur | 286 | 244 | -43 | -15 |
| Skip og flogfør | 25 | 41 | 16 | 65 |

*Talva 1: Vøruútflutningurin í virði. Januar - juli 2019 og 2020. Kelda og mynd: Hagstova Føroya*

Verður hugt eftir tonsum, so er minkingin í fiskavøruútflutninginum í sama tíðarskeiði 14% (Talva 2), og har kann serliga leggjast til merkis, at nøgdin av útfluttum toski er minkað 29%. Tað eru sjálvandi eisini onnur viðurskifti enn Covid-19, sum gera seg galdandi her, men Covid-19 er óivað ein av orsøkunum til minkingina.

**Fiskavøruútflutningur í nøgd skiftur á høvuðssløg**
Januar-juli 2019 og 2020, tons

| | Januar-juli | | Munur | |
|---|---|---|---|---|
| | 2019 | 2020 | í tonsum | í % |
| **Fiskavøruútflutningurin tilsamans** | **261.029** | **225.209** | **-35.820** | **-14** |
| Toskur | 18.470 | 13.145 | -5.325 | -29 |
| Upsi | 6.669 | 6.409 | -260 | -4 |
| Hýsa | 4.562 | 4.106 | -455 | -10 |
| Makrelur | 43.495 | 40.515 | -2.980 | -7 |
| Sild | 30.569 | 32.286 | 1.717 | 6 |
| Svartkjaftur | 26.461 | 32.406 | 5.945 | 22 |
| Svartkalvi | 1.556 | 1.417 | -139 | -9 |
| Laksur | 35.887 | 33.137 | -2.750 | -8 |
| Slógv og fiskaúrdráttir | 50.251 | 15.621 | -34.629 | -69 |
| Annar fiskur | 43.110 | 46.167 | 3.057 | 7 |

*Talva 2: Vøruútflutningurin í nøgdum. Januar - juli 2019 og 2020. Kelda og mynd: Hagstova Føroya*

Búskaparráðið metir eisini í heystfrágreiðing sínari í ár, at útflutningurin verður væl lægri í 2020 orsakað av koronafarsóttini. “Framleiðarar av alilaksi hava í stóran mun umlagt framleiðsluna til laksaportiónir vegna lægri eftirspurningi frá matstovum og catering kring heimin, og smásøla gevur ikki eins høgan prís, sum matstovu- og cateringmarknaðurin. Veiddur uppsjóvar- og botnfiskur hevur í stóran mun verið lagdur inn á goymslur hetta árið vegna avmarkaða atgongd til útflutningsmarknaðirnar. Stóra útboðið kann elva til prísfall, tá ið marknaðirnir lata upp aftur, og roknað verður við einum korona-atvoldum prísfalli á bæði alilaksi, makreli og øllum botnfiskasløgum” (Búskaparráðið 2020: 10).

Sambært GlobeFish undir Food and Agriculture Organization of the United Nations (FAO), so eru útlitini vánalig fyri botnfiskamarknaðin (Globefish 2020a). Tað verður selt munandi minni, tí at matstovur og gistingarhús hava verið stongd ella havt lítið virksemi. Í teimum londum, har samfeløgini eru latin uppaftur, er eftirspurningurin avmarkaður, tí at fólk vegna smittuvandan eru meira afturhaldandi at fara út at eta og vilja heldur vera heima.

Eftir fyrstu bylgjuna í marts og apríl, so vóru tekin í mai og juni um framstig, sum góvu meira bjartskygni um framtíðina. Men í juli og august hevur ein 2. bylgja av korona herjað á fleiri av okkara høvuðsmarknaðum. Tí er aftur ein afturgongd at hóma nú. Mett verður, at tað fer at taka munandi longri tíð, til marknaðurin kemur upp á sama stigið sum áðrenn Covid-19. FAO metir, at sølan av feskum fiski er mest ávirkað, men prísirnir fyri frystan fisk hava hildið sær heldur betur. Sambært Globefish verður mett, at prísurin ikki kemur uppaftur, fyrr enn Covid-19 smittan er bast, ella eitt koppingarevni er funnið. Tey meta tí, at framtíðarútlitini eru døpur fyri 2020 og møguliga eisini langt inn í 2021 (Globefish 2020a).

Globefish (Globefish 2020b) gjørdi eisini eina Covid-19 støðumeting av laksamarknaðinum í september. Árið byrjaði sera væl um allan heimin bæði viðvíkjandi prísi og nøgd. Covid-19 farsóttin ávirkaði tó beinanvegin marknaðirnar á ymsan hátt. Sum vit longu hava greitt frá, so nevnir Globefish fallandi prísirnar á alifiski og eisini, at tað hava verið logistiskar avbjóðingar - serliga viðvíkjandi feskum

laksi, sum varð flogin út á marknaðirnar. Minkandi eftirspurningurin frá matstovum og gistingarhúsum hevur ført við sær eitt prísfall umframt eina broyting í framleiðsluni og marknaðarsegmentum. Laksaframleiðarar hava virðisøkt laksin meira og selt meira í smásølu orsakað av øktum eftirspurningi frá húsarhaldum. Hendan broytingin kann gagna laksaframleiðarunum í framtíðini, metir Globefish (2020b).

Sum heild verður ringt at spáa um, hvussu 2020 fer at hepnast. Allir marknaðirnir uttan Brasilia og USA eru í løtuni spakuliga við at koma fyri seg aftur. Tó meta tey, at hóast eftirspurningurin økist, fara prísirnir væntandi at halda sær á einum lágum støði restina av árinum, av tí at útboðið á marknaðinum er økt. Kortini eru møguleikar at troyta. Globefish (2020b) endar við at siga, at stórar nøgdir, lægri prísir og ein vøkstur í smásøluni kunnu økja eftirspurningin eftir laksi og eisini eggja til nýskapan í vørumenning og nýggjar marknaðir.

## Virkisbúskaparligar avleiðingar

### *Alivinna*

Í hesum partinum viðgera vit lyklatølini í føroysku alivinnuni fyri at meta um, hvørja ávirkan koronafarsóttin hevur havt á virksemið. Fyrst hyggja vit eftir NASDAQ-prísindeksinum fyri laks í 2019 og 2020. Á myndini vinstrumegin niðanfyri síggjast laksaprísirnir fyri hvørja einstaka viku. Her sæst, at indeksið fall frá 94 í viku 9 til 62 í viku 19 í 2020. Vikurnar 21 – 23 vuksu prísirnir upp á næstan sama stig sum í somu vikum í 2019. Síðani kemur eitt prísfall, sum fylgir árstíðarbroytingum í undanfarnu árunum. Á myndini høgrumegin síggjast vikuligar broytingar í prísinum frá ári til ár. Her sæst, at 2020 byrjaði væl og hevði góð útlit. Í vikunum 10 – 20 broyttist hetta skjótt skeiva vegin. Tó kann sigast, at prísmunurin aftaná hetta og í endanum av tíðarskeiðinum, sum vit hava hugt eftir, er í tráð við eitt árstíðarknýtt prísfall. Miðalprísurin fyrstu 27 vikurnar av 2020 var enntá 0,62 prosentstig hægri samanborið við fyrstu 27 vikurnar av 2019.







*Mynd 4: NASDAQ Salmon Price Index 2019 og 2020*[1]

Hóast hetta so er sjálvandi neyðugt at leggja upp fyri útboði og eftirspurningi á feskfiskamarknaðinum. Myndirnar niðanfyri vísa, at tann mest grundleggjandi reglan í búskaparfrøðini eisini heldur, tá umræður Covid-19. Tað er heilt greitt, at prísirnir flyta seg samsvarandi útboðnum.

[1] Fish Pool Index vektaða Nasdaq 99% og SSB 5% brúkar fast vektarbýti: i) 3-4kg: 30%, ii) 4-5kg: 40% and iii) 5-6kg: 30%







*Mynd 5: Samband millum útboð og prísir. Kelda: FishPool*

Hendan verkætlanin er grundað á almenn hagtøl og hagtøl frá føroyskum alifyritøkum. Við hesum er tað møguligt at gera okkara egnu útrokningar og framleiða ymisk indeks, sum vit vísa niðanfyri. Framtíðarnøgdin av laksi er úrslit av einari langari tilgongd (t.d. smolti, fóðri, felli og broytandi hita í sjónum), og tískil eigur tað ikki at koma óvart á nakran, at talan er um lutfalsliga javnar nøgdir av biomassa og alivirksemi á føroysku firðunum, hóast Covid-19 farsóttin hevur herjað seinastu tíðina. Sambært hagtølum frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (2020) vóru í miðal 19,6 mió. fiskar á føroysku alifirðunum fyrra hálvár 2020 í mun til 18,2 mió. fyrra hálvár 2019.







*Mynd 6: Nøgd av fiski á føroyskum alifirðum vinstrumegin og tøka høgrumegin. Kelda: Heilsufrøðiliga Starvstovan*

Við støði í hesum ber til at hyggja eftir lutfallinum millum vøruogn og vøruskuld[2]. Hetta lutfallið má vera á einum ávísum støði fyri at megna longu framleiðslutilgongdina innan aling (rakstrarváðan). Her kann leggjast afturat, at styttri tíð hjá fiskinum í sjónum kann vera við til at økja ferðina á innkomandi peningastreyminum (cash flow), sum síðani er grundarlagið undir øktum rakstrarpeningi.

Mynd 7 niðanfyri vísir indeks fyri arbeiðskapitalin í vinnuni, har mann tekur lutfallið millum vøruogn og vøruskuld, og gevur hetta eina góða og álítandi mynd til samanberingar. Tað er týdningarmikið at hava í huga, at hetta er grundað á avmarkað hagtøl, umframt at tað kunnu vera innanhýsis bókhaldsviðurskifti, sum ávirka hagtølini. Kortini síggjast broytingar í báðum lutføllunum, serliga í 2. ársfjórðingi 2020 í mun til tað annars støðuga 2019. Hetta kann vera tekin um, at Covid-19 hevur ávirkað hesi viðurskiftini hjá fyritøkunum.

2 Vøruogn: Enska heitið er "Accounts receivables". Tað, sum feløgini hava útistandandi/til góðar. Vøruskuld: Enska heitið er "Accounts payables". Tað, sum feløgini skylda ognarum.
Bæði hugtøkini taka støði í, at talan er um stuttfreistaða ogn og stuttfreistaða skuld.




*Mynd 7: Indeks við vøruogn vinstrumegin og vøruskuld høgrumegin. Jan. 2019 og jan. 2020 = 100. Kelda: Hagtøl frá fyritøkunum*

Alivinnan er ein kapital-krevjandi vinna, serliga tí hon hevur so nógvan pening bundnan í svimjandi laksinum. Vit vænta, at alifyritøkurnar her hava atgongd til fígging bæði í Føroyum og á altjóða fíggjarmarknaðinum[3], og hetta kann minka um fíggjarliga trýstið í serstøðum sum Covid-19. Í Mynd 8 verður víst, hvussu alifyritøkurnar hava stýrt fíggjarliga. Vinstrumegin sæst, at hetta er væl skipað, og at skuldin er hampiliga jøvn gjøgnum tíðarskeiðið. Høgrumegin eru ábendingar um, at Covid-19 kann hava ávirkað gjaldførið jaliga við økjandi indeksvirðum aftaná Covid-19. Hetta kann vera tekin um, at fyritøkurnar hava økt um gjaldførið[4] fyri at standa ímóti óvissu støðunum, sum koronafarsóttin kann hava við sær.




*Mynd 8: Indeks við føstum fíggjarútreiðslum vinstrumegin og tøkum peningi høgrumegin. Jan. 2019 og jan. 2020 = 100. Kelda: Hagtøl frá fyritøkum*

Sum dømi um tillagan hjá fyritøkunum hevur Bakkafrost økt um framleiðsluna av meirvirkaðum vørum. Hetta sæst á Mynd 9 niðanfyri, sum eru býtt í ársfjórðingar og mánaðir. Hetta vísir týdningin av at kunna tillaga framleiðsluna og at hava fíggjarliga styrki, tá búskaparstoytir koma fyri. Stutttíðarávirkanin av Covid-19 er lættari at skilja, men onkrar jaligar langtíðarávirkanir kunnu eisini hómast. Fyritøkurnar, vit hava greinað her, sum klára at gera íløgur og stýra væl ígjøgnum kreppustøður, kunnu fáa stórar strategiskar fyrimunir í afturgongdartíðum, men hetta kann eisini gagna teimum í framtíðini.

[3] Bæði Mowi og Bakkafrost hava atgongd til altjóða fíggjarmarknaðir

[4] T.d. avgjørdi nevndin í Bakkafrost ikki at gjalda vinningsbýti fyri 2019 orsakað av koronastøðuni (Interim Report, Q2 2020).




*Mynd 9: Indeks av meirvirking hjá Bakkafrost. Kelda: Bakkafrost (2020).*

## Fiskivinna

Í hesum partinum verður dentur lagdur á fiskivinnuna og lyklatølini í hesum fyritøkunum. Samanborið við alivinnuna, sum er ein framleiðsluvinna, eru fleiri uttanhýsis viðurskifti, sum ávirka fiskivinnuna. Lívfrøðilig, umhvørvislig, búskaparlig og politisk viðurskifti ávirka fiskivinnuna, og tí er truplari at meta ítøkiliga um ávirkanina. Tað er greitt frá samrøðunum, vit hava havt við lyklapersónar í fyritøkunum, at koronafarsóttin hevur ávirkað. Tó er torført at meta um, hvat er ávirkan av koronafarsóttini, og hvat er aðrar orsøkir. Hóast fyritøkurnar, sum hava veitt hagtøl, eru sera ymiskar, so taka vit í hesum partinum ikki støði í munum, men viðgera tølini sum eina heild.

Mynd 10 vísir søluna í 2019 og 2020 í indeks. Her sæst, at árið 2020 er munandi verri enn 2019, bæði tá ið talan er um nøgd og virði, fyri tíðarskeiðini hagtøl eru tøk. Hagtølini vísa eina niðurgongd bæði árini, men fallið er munandi størri í 2020. Tað er greitt, at ein orsøk til hetta er koronafarsóttin. Tó kann sigast, at niðurgongdin er ikki so ógvuslig ímóti endanum av 2. ársfjórðingi í 2020.




*Mynd 10: Søluindeks í donskum krónum. Nøgd vinstrumegin og virði høgrumegin. Kelda: Hagtøl frá fyritøkum*

Tað er sjálvandi altíð ein ávís nøgd av fiski á goymslu uttan mun til nøgdina, sum verður fiskað. Tað gongur sjálvandi altíð ein løta frá tí, at fiskurin er veiddur, til hann er komin út á marknaðin til brúkaran, sum síðani tekur støðu til, hvat hann keypir. Tað er eyðsæð, at krøvini um frástøðu og at stongja matstovur og arbeiðspláss hava havt ávirkan á húsarhaldsnýtsluna, og at eftirspurningurin frá matstovum er minkaður, meðan eftirspurningurin í smásølu er munandi øktur, tí at fólk eta meira heima enn áður. Hóast tað er trupult at skilja ávirkanina av Covid-19 frá øðrum orsøkum, so er greitt, at broytingar í nýtsluni síggjast týðiliga í indeksinum niðanfyri.




*Mynd 11: Indeks av vøru-ogn og vøru-skuld í fiskivinnufyritøkum. Kelda: Hagtøl frá fyritøkunum*

Á Mynd 12 síggja vit, hvussu fíggjarútreiðslurnar og tøkur peningur hava verið higartil í 2020, samanborið við 2019. Tað er eyðsæð, at føroyskar fiskivinnufyritøkur hava havt avbjóðingar í sambandi við Covid-19, og hetta sæst serliga við, at umsetningurin er fallin. Hetta hevur sjálvandi minkað um gjaldførið hjá vinnuni. Harumframt kann trekari sølan, sum myndin niðanfyri bendir á, hava víðari avleiðingar fyri nakrar fyritøkur, serliga tá gjaldførið er viknað at byrja við. Hetta kundi borið við sær, at summar fyritøkur fóru á húsagang. Tó so vísir Mynd 12 niðanfyri, at fyritøkurnar hava megnað at staðið ímóti, hóast trekari sølu og minkandi eftirspurning.




*Mynd 12: Indeks við føstum fíggjarútreiðslum vinstrumegin og tøkum peningi høgrumegin. Kelda: Hagtøl frá fyritøkunum*

## Nakrar virkisbúskaparligar niðurstøður

Virkisbúskaparliga greiningin vísir, at koronafarsóttin hevur uttan iva ávirkað føroyska fiski- og alivinnu. Kortini kann staðfestast, at vit vita ikki um nakra fyritøku, ið er farin á húsagang. Hetta í sær sjálvum er ein ábending um, at føroyska fiski- og alivinnan eru mótstøðuførar. Ávirkanin av Covid-19 fer tó sannlíkt at krevja, at vinnan tillagar seg og effektiviserar bæði viðvíkjandi kapitali og arbeiðsmegi.

Tað er týdningarmikið at staðfesta, at endaliga ávirkanin av Covid-19 er sera óviss. Tað eru tvey vinnubúskaparlig atlit, sum hava týdning fyri, hvussu fyritøkurnar klára at standa ímóti óvissu framtíðini, bæði við koronafarsóttini og aftaná. Tað fyrra er, at tøkur peningur er av alstórum týdningi, serliga í kreppustøðum. Tað eru longu stórar broytingar í tøkum peningi frá ári til ár orsakað av sveiggjum í nøgdum og sølu. Summar fyritøkur hava eitt varandi vánaligt gjaldføri. Í teimum førunum kann ein drúgvari niðurgongd í sølu og prísum gera tað trupult hjá teimum at standa ímóti í longdini. Tað seinna er, at fyritøkur við góðum gjaldføri kunnu halda fram at gera íløgur. Hetta økir um mótstøðuførið og ger tær við tíðini meira kappingarførar samanborið við aðrar fyritøkur. Áðrenn vit hyggja nærri at gongdini í fiskaprísum, kann sigast, at tað er óvist, hvussu keypararnir úti á

marknaðinum fara at tillaga seg, og tí kunnu brádligar broytingar koma fyri. Her fara gjaldføri og evnini hjá fyritøkunum at tillaga seg í framleiðsluni og til broyttar marknaðir at vera altavgerandi.

## Greining av prísárinum av Covid-19

Størsta beinleiðis ávirkanin av Covid-19 á fiskivinnuna og alivinnuna er á prísin á vørunum og í nógv minni mun á framleiddu nøgdirnar. Vit fara her at greina prísgongdina.

### *Útrokning av "vanligum" prísi*

Fyri at kunna meta um árinið av Covid-19 á fiskaprísirnar er neyðugt at hava eina meting av, hvat prísurin hevði verið, um Covid-19 ikki var. Prísútrokningin verður gjørd við at framrokna prísin og rokna árstíðarsveiggini inn í prísgongdina. Sum dømi um slíka útrokning fara vit at hyggja nærri at toskaprísinum hjá húkaveiðini.

Mynd 13 vísir toskaprísin hjá húkaveiðini frá januar 2015 til september 2020. Toskaprísurin hevur eitt rættiliga týðiligt ártíðarmynstur, har prísurin fer upp um veturin og er lægri um summarið. Summarhálvuna liggur prísurin vanliga um 14 prosent lægri enn um veturin. Myndin vísir eina framrokning av toskaprísinum, har støði er tikið í miðalprísinum fyri januar og februar, og síðan er mánaðarligi prísurin funnin við at rokna árstíðarsveiggini inn í prísin.

Við at samanbera roknaðu, vanligu prísgongdina (t.e. reyða linjan) við veruliga avreiðingarprísin (bláa linjan), ber til at gera eina meting av, hvussu nógv prísurin er ávirkaður av Covid-19.



*Mynd 13: Prísurin á toski frá húkafiskiskapinum hevur føst árstíðarsveiggj.*

### *Húkafiskiskapurin*

Týdningarmestu fiskasløgini í húkafiskiskapinum eru víst í Mynd 14, sum vísir býtið av avreiðingarvirðinum fyri tíðarskeiðið 2015-2019. Yvir helmingurin av avreiðingarvirðinum í húkafiskiskapinum stavaði frá toskinum (57%), harnæst komu hýsan (18%) og longan (13%). Hetta merkir, at útvið 90 prosent av øllum landingarvirðinum vanliga stavar frá hesum trimum fiskasløgunum. Verða brosman (4%) og svartkalvin (4%) tikin við, er talan um 96 prosent av landingarvirðinum.

Prísirnir á teimum fimm týdningarmestu fiskasløgunum í húkafiskiskapinum hava verið fallandi, síðan Covid-19 byrjaði at gera um seg. T.d. hevur prísurin á toski vanliga ligið um 20 kr/kg, og er hann fallin nærum niður á 15 kr/kg. Hýsan hevur vanliga ligið á 15 kr/kg og er fallin niður um 10 kr/kg. Talan er

sostatt um munandi prísfall á øllum fiskasløgum, og enn er eingin ábending um, at prísfallið er við at hæsa av. Tó skal viðmerkjast, at vit her brúka tøl frá Hagstovu Føroya, meðan nýggjastu tølini frá Teyggjuni geva ábending um, at m.a. toska- og hýsuprísirnir hava verið frægari seinastu tíðina.




*Mynd 14: Nógv tey týdningarmestu fiskasløgini í húkafiskiskapinum eru toskur, hýsa og longa. Síðan Covid-19 byrjaði at gera um seg í mars 2020, er prísurin á týdningarmestu fiskasløgunum í húkafiskiskapinum fallin munandi.*

Við at samanbera eina roknaða prísgongd við veruliga prísin í 2020 ber til at siga nakað um, hvørja ávirkan Covid-19 hevur havt á fiskaprísin. Hetta er avmyndað í vinstra parti av Mynd 15. Til og við mars sást einki til nakra óvanliga prísgongd. Onkur prísur fór upp, og onkur fór niður, men eingi greið tekin vóru um nakra eintýðuga gongd upp ella niður. Tó kann sigast, at prísfallið á longu og brosmu tykist vera byrjað í mars.

Frá apríl broyttist hetta, við tað at prísurin á øllum fiskasløgum byrjaði at falla í senn. Prísirnir í apríl lógu um 15-20 prosent lægri enn vanliga prísgongdin. Prísfallið helt áfram næstu mánaðirnar, og í september lógu prísirnir á hýsu, longu og brosmu meiri enn 40 prosent lægri samanborið við vanliga prísgongd. Prísurin á toskinum lá tó 20 prosent lægri. Her má fyrivarni takast fyri, at tølini fyri september eru fyribilstøl og kunnu broytast. Svartkalvin er ikki vístur í myndini, men fallið har lá um 20-25%.




*Mynd 15: Avreiðingarprísurin hevur frá apríl verið munandi lægri enn vanligt á flest øllum fiskasløgum í húkafiskiskapinum.*

Tað er greitt, at stóra prísfallið hevur havt neiliga ávirkan á avreiðingarvirðið. Høgri partur av Mynd 15 vísir samlaða avreiðingarvirðið í 2020 samanborið við tað, sum hevði verið við vanligari prísgongd. Fyrstu tríggir mánaðirnir vóru nakað sum vanligt, men frá apríl hava prísirnir havt stóra ávirkan á samlaða avreiðingarvirðið. Av tí at toskurin ikki er fallin eins nógv í prísi og hini fiskasløgini, bøtir tað nakað um støðuna, og liggur mánaðarligi munurin í august og september millum 25 og 30 prosent.

Verður hugt at samlaða muninum fyri alt árið, sæst, at tá komið er út í september, liggur avreiðingarvirðið fyrstu níggju mánaðirnar samanlagt 9 prosent lægri enn vanliga prísgongdin. Um prísirnir frá september halda sær árið út, og verður roknað við, at nøgdirnar fyri oktober, november og desember verða tær somu sum í 2019, verður samlaði munurin um 15 prosent fyri alt árið 2020. Fyrivarni skal takast fyri, at her er ikki tikið við, at royndin eftir fiski kann vera broytt orsakað av prísbroytingunum. Um royndin er minkað av hesum, hevur Covid-19 havt enn størri ávirkan á húkafiskiskapin enn tað, sum her er mett.

## *Trolfiskiskapurin*

Mynd 16 vísir týdningarmestu fiskasløgini í trolfiskiskapinum eftir avreiðingarvirðinum fyri 2015-2019. Upsin hevur størstan týdning (34%), harnæst koma makrelur (16%), svartkalvi (16%), gulllaksur (13%), toskur (8%) og longa (4%). Talan er sostatt um spjaðing á fleiri fiskasløg enn í húkafiskiskapinum, har toskur og hýsa stóðu fyri umleið 75 prosentum av avreiðingarvirðinum.







*Mynd 16: Mest vanligu fiskasløgini í trolfiskiskapinum eru upsi, makrelur, svartkalvi, gullaksur og toskur. Prísirnir hjá trolfiskiskapinum hava yvirhøvur verið fallandi, síðan Covid-19 kom. Tó er upsaprísurin ikki minkaður, og tekin eru um, at m.a. toskaprísurin er á veg uppaftur.*

Høgrumegin í Mynd 16 er prísgongdin í týdningarmestu fiskasløgunum í trolfiskiskapinum víst. Flestu fiskasløgini eru fallin í prísi, tó er upsaprísurin farin upp, síðan ávirkanin av Covid-19 byrjaði. Tekin eru um, at toskaprísurin og møguliga svartkalvaprísurin eru batnandi aftur.

Eins og við húkafiskiskapinum ber til at rokna út, hvussu mánaðarliga prísgongdin á ymisku fiskasløgunum hevði verið í 2020, um vanliga prísgongdin hevði hildið fram. Við at samanbera hesa gongdina við veruliga prísin í 2020 ber til at siga nakað um, hvørja ávirkan Covid-19 hevur havt á fiskaprísirnar.

Mynd 17 vísir lutfalsligu broytingina í fiskaprísunum. Til og við mars vóru ikki stórvegis tekin um øðrvísi prísgongd enn undanfarin ár, men frá apríl byrjaðu prísirnir á flest øllum fiskasløgum at falla og lógu um 15-20 prosent lægri enn við vanligari prísgongd, tó hevur upsaprísurin verið vaksandi alt tíðarskeiðið. Størsta prísfallið er at síggja á svartkalva- og longuprísunum.

Yvirhøvur eru prísirnir tó frægari enn í húkafiskiskapinum, har munurin millum vanligu gongdina og staðfestu gongdina á prísunum var oman fyri 40 prosent á fleiri fiskasløgum. Fleiri prísir vísa eisini tekin um batar seinastu mánaðirnar, t.d. er toskaprísurin frægari, og svartkalvaprísurin tykist eisini nakað frægari. Tað er tó ilt at siga við vissu, um prísgongdin er um at venda til tað betra, ella um talan bert er um sveiggj.







*Mynd 17: Prísirnir hjá trolfiskiskapinum hava verið lægri enn við vanligari prísgongd, tó hevur upsaprísurin ligið oman fyri vanliga prísgongd. Samlaða avreiðingarvirðið hjá trolfiskiskapinum hevur ligið nakað lægri enn við vanligari prísgongd, men munurin er ikki eins stórur og við húkafiskiskapinum.*

Mynd 17 høgrumegin samanber samlaða avreiðingarvirðið í 2020 við tað, sum tað hevði verið við vanligari prísgongd. Av tí at prísfallið á flestu fiskasløgum er væl minni enn við húkaveiðini, og tí at upsaprísurin hevur verið vaksandi, eru bæði mánaðarliga og samlaða ávirkanin á avreiðingarvirðið munandi minni enn við húkaveiðini.

Í juli og august, har mánaðarliga ávirkanin er størst, hevur munurin á prísunum sammett við vanliga prísgongd ligið um 10 prosent. Á grønu súlunum sæst, at tá komið er út í august, liggur samlaða avreiðingarvirðið fyrstu níggju mánaðirnar um 6% lægri, enn um prísgongdin hevði verið vanlig.

Um prísirnir frá september halda sær árið út, og verður roknað við, at nøgdirnar fyri oktober, november og desember verða tær somu sum í 2019, verður samlaði munurin um 5-6 prosent fyri alt árið 2020.

## *Flakatrolarar*

Mynd 18 vísir týdningarmestu fiskasløgini hjá flakatrolarunum. Støði er tikið í avreiðingarvirðunum í tíðarskeiðinum frá 2015 til 2019. Myndin vísir, at 81 prosent av øllum avreiðingarvirðinum er toskur, sum sostatt er nógv tað týdningarmesta fiskaslagið hjá flakatrolarunum.

Næst eftir toskinum er hýsan (6%), rækjur (4%), svartkalvi (3%) og annað (6%). Av tí at øll veiðan av toski verður bólkað saman, hóast partur av veiðuni verður skorin til flak, meðan annar partur einans verður kruvdur og avhøvdaður, ber ikki til at gera nakra prísútrokning fyri flakatrolararnar.

Sambært frágreiðing frá reiðarum á flakatrolarum líkist prísgongdin tó tí hjá toski í hinum skipabólkunum, t.v.s. at prísurin er lækkaður við 10-20 prosentum. Somuleiðis verður sagt, at prísirnir eru batnandi.




*Mynd 18: Týdningarmesta fiskaslagið hjá flakatrolarunum er toskur, sum stendur fyri 81 prosentum av veiðivirðinum.*

## *Uppsjóvarfiskiskapur*

Mynd 19 vísir týdningarmestu fiskasløgini hjá nóta- og ídnaðarskipum, eisini rópt uppsjóvarskipini. Svartkjaftur (37%) hevur størstan týdning, harnæst koma makrelur (35%), sild (24%) og lodna (4%).







*Mynd 19: Týdningarmestu fiskasløgini í uppsjóvarfiskiskapinum eru svartkjaftur, makrelur og sild. Tað eru týðilig árstíðarmynstur í fiskiskapinum eftir uppsjóvarfiski.*

Høgrumegin á Mynd 19 er mánaðarligi fiskiskapurin eftir uppsjóvarfiski frá juli 2017 til juli 2019. Har sæst, at uppsjóvarfiskiskapurin hevur heilt greiða árstíðargongd. Í august og september tekur fiskiskapurin eftir makreli seg upp. Síðan verður farið yvir til fiskiskap eftir sild í oktober og november, til makrel og svartkjaft frá desember til januar og til einans svartkjaft fram til juni. Fyri eina greining av prísávirkanini av Covid-19 merkir hetta, at av tí at Covid-19 tók seg upp frá umleið mars mánaða, hevur ávirkanin á makrel og sild verið ógvuliga avmarkað og kundi ikki síggjast fyrr enn í august og september, tá fiskiskapurin eftir makreli tók seg upp aftur.

Mynd 20 vísir prísgongdina á makreli, sild og svartkjafti frá januar 2015 og fram til september 2020. Tað er greitt, at prísurin á makreli liggur væl lægri enn undanfarnu árini, og at prísurin á sild eisini er í lægra lagi. Harafturímóti sæst eingin minking í prísinum á svartkjaftinum.




*Mynd 20: Prísirnir á makreli og sild eru falnir síðan Covid-19 fór at gera um seg, tó hevur svartkjaftaprísurin verið rættiliga høgur. Kelda: Hagstova Føroya og Teyggjan*

Mynd 21 vísir lutfalsligu broytingina í fiskaprísunum samanborið við, um vanliga prísgongdin hevði hildið fram. Harvið sæst, hvørja ávirkan Covid-19 hevur havt á fiskaprísin. Prísurin á svartkjafti hevur ikki verið lægri enn við vanligari prísgongd, heldur tvørturímóti hevur hann verið nakað hægri. Harafturímóti sæst, at prísurin á makreli og sild hevur verið nakað lægri, enn ein kundi væntað, um prísgongdin hevði verið sum vanligt. Í august lógu prísirnir á makreli og sild um 40% lægri, og í september um 20% lægri í mun til vanliga prísgongd.







*Mynd 21: Svartkjaftaprísurin hevur ligið oman fyri vanliga prísgongd, meðan makrel- og sildaprísirnir hava verið væl lægri enn við vanligari prísgongd. Avreiðingarvirðið á uppsjóvarfiskiskapinum hevur yvirhøvur ligið hægri enn við vanligari prísgongd, tó er avreiðingarvirðið fallið munandi í august og september.*

Høgrumegin á Mynd 21 síggjast avleiðingarnar av Covid-19 fyri avreiðingarvirðið á uppsjóvarfiski. Heilt fram til juli mánaða var avleiðingin jalig, við tað at tað næstan bara var svartkjaftur, sum varð fiskaður, og prísurin á svartkjafti var hægri enn við vanligari prísgongd. Í august byrjaði fiskiskapurin eftir makreli, og av tí at prísurin á makreli var lægri enn við vanligari prísgongd, hevði hetta neiliga ávirkan á avreiðingarvirðið. Í september var avreiðingarvirðið fyrstu níggju mánaðirnar 3 prosent lægri enn við vanligari prísgongd. Um prísirnir frá september halda sær árið út, og verður roknað við, at nøgdirnar fyri oktober, november og desember verða tær somu sum í 2019, so verður samlaði munurin um 6 prosent fyri alt árið 2020.

### *Alivinnan*

Mynd 22 vísir prísgongdina á laksi í tíðarskeiðinum frá januar 2015 til september 2020. Prísurin er fallin munandi, síðan Covid-19 fór at gera um seg í mars 2020. Frá at hava ligið um 45 kr/kg lá hann í september undir 35 kr/kg. Mynd 22 høgrumegin samanber prísin á laksi við tað, sum hann hevði verið við vanligari prígongd. Síðan mars hevur prísurin ligið umleið 30 prosent undir tað, hann hevði verið við vanligari prísgongd. Eingi greið tekin eru um, at prísurin er við at rætta seg uppaftur, men ábendingar eru um, at hann nokk ikki fer longur niður, tí størsti munurin millum staðfesta prísin og tann roknaða vanliga prísin var í apríl við 40 prosentum. Síðan tá er munurin minkaður nakað.




*Mynd 22: Prísurin á laksi er fallin munandi, síðan Covid-19 fór at gera um seg og hevur síðan mars ligið um 30 prosent lægri enn við vanligari prísgongd.*

## Framskrivingar av prísávirkan av Covid-19

Við gjøgnumgongdini av prísunum í teimum ymsu fiskiskapunum og í alivinnuni ber til at fáa eina fatan av verandi prísgongd. Fyri at fáa framt eina framskriving av árinunum av Covid-19 er tó neyðugt at gera metingar av prísunum komandi mánaðirnar.

Á næstu myndunum eru metingar, ið liggja sum grundarlag undir útrokningunum av búskaparligu avleiðingunum av Covid-19. Talan er ikki um nakra nágreiniliga meting, tí tað letur seg illa gera við tí stóru óvissu, sum er um støðuna við Covid-19 í løtuni. Tríggjar ymiskar, leysligar metingar eru gjørdar fyri á tann hátt at hava eitt grundarlag at rokna árinið á vinnuna og búskapin.

Mynd 23 vísir metingarnar av prísgongdini í húkafiskiskapinum og trolfiskiskapinum. Roknað er við, at vánaligi prísurin í húkafiskiskapinum heldur sær eina tíð aftrat, men at hann fer at rætta seg upp aftur í nýggja árinum. Tó verður mett, at Covid-19 fer at ávirka prísin bæði í 2021 og 2022. Orsøkin til metingina um at prísirnir ikki rætta seg skjótari uppaftur, er, at undir greiningini av verandi prísgongd vóru ongar greiðar ábendingar um, at prísirnir vóru um at batna.

Á somu mynd høgrumegin er metingin av prísunum hjá trolarunum. Har er metingin, at prísirnir longu nú eru við at batna og rættiliga skjótt fara at gerast vanligir aftur. Metingin byggir á, at upsaprísurin hevur verið rættiliga góður, og at m.a. toskaprísurin sær út til at vera batnandi.







*Mynd 23: Mett er, at ávirkanin á húkafiskiskapin fer at standa við ein tíð afturat, men at prísirnir fara at rætta seg upp aftur eftir árskiftið. Metingin av prísávirkanini á trolfiskiskapin er, at prísirnir rættiliga skjótt rætta seg upp aftur.*

Mynd 24 vísir metingina av prísunum hjá flakatrolarunum. Metingin byggir á prísgongdina á toski hjá trolarunum, sum longu nú vísti ein bata, og tí er roknað við, at prísárinið av Covid-19 á toskaprísin hjá flakatrolarunum eisini fer at minka, og at prísirnir fara at batna. Sama mynd høgrumegin vísir metingina av prísunum í uppsjóvarfiskiskapinum. Av tí at svartkjaftaprísurin hevur verið góður, hevur prísgongdin til og við juli verið góð, men av tí at prísurin á makreli og sild liggur lægri enn vanligt, og tí at makrel- og sildafiskiskapurin tekur seg upp nú fram til januar, er metingin, at prísávirkanin av Covid-19 verður størri, og at prísirnir fara at falla nakað fyri síðan at rætta seg upp aftur.







*Mynd 24: Metingin av prísgongdini hjá flakatrolarunum er, at prísirnir fara at batna rættiliga skjótt. Metingin av uppsjóvarfiskiskapinum er, at lágu makrel- og sildaprísirnir kunnu fáa neiliga ávirkan á gongdina. Kelda: Egnar útrokningar og metingar (myndin til vinstru). Hagstova Føroya, Teyggjan og egnar útrokningar og metingar (myndin til høgru)*

Mynd 25 vísir metingina av laksaprísinum. Av tí at prísurin er fallin munandi, og prísgongdin einans gevur smærri ábendingar um ein batnandi prís, er metingin, at prísurin einans so líðandi fer at batna, og at rættiliga long tíð gongur, áðrenn prísurin aftur kemur á vanligt støði.




Keldur: Fishpool.eu, FPI Report og egnar metingar

*Mynd 25: Metingin av laksaprísinum er, at prísurin so líðandi fer at rætta seg upp aftur.*

### *Aðrar fortreytir undir árinsmetingunum av Covid-19*

Umframt omanfyri nevndu metingar av prísgongdinim, eru niðanfyristandandi fortreytirnar bygdar inn í útrokningarnar.

- Oljuprísurin er lægri enn undan Covid-19, og harvið er kostnaðurin hjá skipunum lægri
- Flakavinnan framleiðir sum vanligt, tó minni framleiðsla av m.a. saltfiski
- Onnur virkir framleiða sum vanligt
- Pelagisku virkini og Havsbrún framleiða sum vanligt
- Alivinnan framleiðir sum vanligt
- Størri framleiðsla á portiónsvirkinum hjá Bakkafrost
- Íløgurnar hjá bæði fiskivinnu og alivinnu minka
- Eingin broyting er í almenna geiranum, t.v.s. bæði rakstur og íløgur eru sum áður

## Samfelagsbúskaparligar avleiðingar

Útrokningarnar av samfelagsbúskaparligu árinunum av Covid-19 eru bygdar á tær fyritreytir og metingar av prísgongdunum, Útrokningarnar eru einans gjørdar fyri árinið av Covid-19 á fiskivinnuna og alivinnuna og haðani á restina av samfelagsbúskapinum. Hetta skal sostatt ikki takast sum ein samlað framskriving av búskaparárinunum av Covid-19, tí tá skuldi árinið á ferðavinnu, útisiglarar og annað eisini verið tikið við. Tað er ikki gjørt her.

Um rokningarháttin er at siga, at við støði í prísbroytingunum og øðrum fyritreytum varð fyrst roknað árinið á ymisku partarnar av fiskivinnuni og alivinnuni. Við útrokningunum varð komið fram til eina meting av broytingini í inntøku og nýtslu í einstøku vinnugreinunum, sum síðan kundi nýtast til at rokna avleiðingina á avleiddu vinnurnar. Soleiðis fekst ein samlað meting fyri allan búskapin.

Sjálvsagt eru stórar óvissur í sambandi við framskrivingarnar, eins og tað altíð er, tá framskrivingar verða gjørdar. Tó eru óvissurnar fyri 2020 ikki eins stórar, við tað at tríggir ársfjórðingar longu eru farnir, og tí kann ein skeiv meting fyri síðstu tríggjar mánaðirnar ikki broyta so nógv upp á samlaða úrslitið fyri árið. Harafturímóti eru metingarnar fyri 2021 og 2022 rættiliga óvissar, og tí skulu framlitini

ikki takast sum eitt veruligt boð uppá framtíðargongdina, men heldur takast sum ábendingar um, hvørjar avleiðingar ymiskar prísgongdir kunnu fáa á búskapin.

Mynd 26 vísir útrokningarnar fyri 2020, 2021 og 2022. Útrokningarnar vísa, at árinið á samfelagsbúskapin fyri 2020 fer at liggja úr sløkum -4 prosentum til umleið -7 prosent. Hetta merkir ikki, at búskapurin fer at minka við 4-7 prosentum, men at hann er roknaður til at vera 4-7 prosent minni, enn um Covid-19 ikki hevði gjørt um seg og ávirkað fiskaprísir og annað. Frammanundan roknaði m.a. Búskaparráðið við einum vøkstri fyri 2020, og sambært hesum útrokningunum fer tann vøksturin at vera 4-7 prosent minni, enn roknað varð við frammanundan.

Fyri 2021 er roknað við einum árini á millum 3 og 10 prosent. Spjaðingin er sostatt rættiliga stór, og er hetta tekin um ta stóru óvissu, sum er í metingini. Tó kann sigast, at rættiliga greið tekin tykjast vera um, at samfelagsbúskapurin fer at vera neiliga ávirkaður av Covid-19 í 2021, við tað at nógvir fiskaprísir ikki vísa greið tekin um at rætta seg upp aftur í bræði. Fyri 2022 vísa útrokningarnar millum 1 og góð 7 prosent.




*Mynd 26: Útrokningarnar vísa, at árinini av Covid-19 á samfelagsbúskapin fara at merkjast komandi árini, við tað at búskapurin fer at vera minni enn um Covid-19 ikki hevði gjørt um seg.*

**Error! Reference source not found.** Mynd 26 vísir eina sundurgreining av árinunum av Covid-19 á fiskivinnuna, alivinnuna og avleiddar vinnur. Talvan vísir útrokningarnar fyri tríggjar ymiskar gongdir, "miðal meting", "betri føri" og "verri føri", men her verður einans miðal metingin gjøgnumgingin.

Fiskivinnan sum heild merkir ikki tað heilt stóra bakkastið, men einstakir partar av fiskivinnuni merkja sera væl árinið av Covid-19. Serliga er tað húkaflotin, ið merkir stóra prísafturgongd. Húkafiskiskapurin og trolfiskiskapurin eru í vinnugreinahagtølunum taldir saman í bólkinum "feskfiskaveiða", sum er roknaður at hava 12% minking í 2020. Harav minkar húkaflotin mest, meðan trolfiskiskapurin ikki er roknaður at hava nakra serliga minking – serliga tá lagt er upp fyri, at oljuprísurin eisini er lækkaður.

Í 2021 er roknað við enn størri árini av Covid-19, við tað at prísirnir verða ávirkaðir alt árið samanborið við, at teir fyri tað mesta eru ávirkaðir í seinnu hálvu av 2020. Fyri 2022 vísa útrokningarnar ein bata fyri feskfiskaveiðina sammett við 2021, men roknað er framvegis við eini ávirkan av Covid-19. Minkingin hjá flakavirkjunum stavar frá minkandi saltfiskaframleiðslu. Ilt er at meta neyvt, hvussu stór ávirkanin verður, men roknað er við 5-9% minking í samlaðu framleiðsluni í flakavinnuni.

Av øðrum bólkum í fiskivinnuni er tað serliga uppsjóvarfiskiskapurin og flakatrolararnir, ið tykjast blíva raktir. Flakatrolararnir verða serliga raktir í 2020, meðan uppsjóvarfiskiskapurin verður serliga raktur í 2021.

Sundurgreiningin vísir annars, at tað serliga er alivinnan, ið merkir avleiðingarnar av Covid-19, við tað at BTÚ í alivinnuni í 2020 gerst fjórðingin minni, enn um Covid-19 ikki hevði gjørt um seg. Í 2021 eru eisini tekin um eina minni alivinnu enn uttan Covid-19, við tað at metingarnar liggja uppá eina minking á sløk 23 prosent. Orsakað av trekleika í laksaprísinum, sum eisini er mettur at verða ávirkaður í 2022, er eisini roknað við at eini minni alivinnu í 2022 á 13 prosent.

Frá fiskivinnuni og alivinnuni spjaðist árinið út í allan búskapin, og avleiddu vinnurnar merkja tað við minni eftirspurningi eftir teirra vørum og tænastum. Árinið er har mett at liggja millum 2 og 3,5 prosent.

Samlaða árinið á búskapin fer væntandi at liggja um 6-7 prosent í 2020 og 2021 og um 4 prosent í 2022.

**Árin á ymisku vinnugreinarnar**

| | Miðal meting | | | Betri føri | | | Verri føri | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2020** | **2021** | **2022** | **2020** | **2021** | **2022** | **2020** | **2021** | **2022** |
| Feskfiskaveiða | -12,0% | -16,0% | -9,5% | -9,7% | -4,1% | -3,1% | -12,3% | -27,7% | -19,6% |
| Flakavirkir | -5,0% | -7,9% | -8,8% | -5,0% | -6,9% | -6,9% | -7,0% | -11,7% | -16,1% |
| Onnur fiskavirkir | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| Flakatrolarar | -10,0% | -2,0% | -3,2% | -10,0% | 2,8% | -1,5% | -10,0% | -6,8% | -8,0% |
| Uppsjóvarfiskiskapur | -7,4% | -12,3% | -4,3% | -4,4% | -0,4% | -0,2% | -8,7% | -28,8% | -17,2% |
| Uppsjóvarvirkir | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| **Fiskivinna tilsamans** | **-6,4%** | **-8,5%** | **-4,3%** | **-4,8%** | **-1,0%** | **-1,3%** | **-7,1%** | **-18,0%** | **-12,3%** |
| Fiskaaling | -40,2% | -32,2% | -17,4% | -38,5% | -19,1% | -5,4% | -42,2% | -48,7% | -33,8% |
| Sláturvirkir | 10,0% | 4,5% | -0,2% | 10,0% | 1,2% | 0,2% | 10,0% | 21,0% | 15,0% |
| **Alivinna tilsamans** | **-27,2%** | **-22,7%** | **-13,0%** | **-26,0%** | **-13,9%** | **-4,0%** | **-28,7%** | **-30,7%** | **-21,2%** |
| Avleiddar vinnur | -2,1% | -3,5% | -2,6% | -0,8% | -2,3% | -0,7% | -2,7% | -3,9% | -3,1% |
| Almenni geirin | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| **Tilsamans** | **-6,5%** | **-6,8%** | **-4,1%** | **-5,4%** | **-3,5%** | **-1,2%** | **-7,2%** | **-10,0%** | **-7,1%** |

*Talva 3: Sundurgreiningin av árinunum av Covid-19 vísir, at tað serliga er alivinnan, sum fær eina afturgongd og minkar umleið ein fjórðing. Kelda: Egnar útrokningar.*

Meðan Talva 3 vísir árinið á ymisku vinnugreinarnar, vísir Talva 4 árinið á BTÚ útgreinað á vinnugreinar. T.d. er minkingin í BTÚ roknað til at liggja um 6,5 prosent í 2020. Harav er mett at 1,1 prosent stavar frá fiskivinnuni, 4,4 prosent frá alivinnuni og 1,0 prosent frá avleiddum vinnum. T.v.s. at alivinnan er roknað at vera tann vinnugreinin, sum hevur største einstøku ávirkanina á broytingina í BTÚ í 2020. Hóast Talva 3 vísti, at feskfiskaveiðan hevði størstu lutfalsligu minkingina, so vísir Talva 4, at uppsjóvarfiskiskapurin hevur størri ávirkan á BTÚ. Orsøkin til hetta er, at uppsjóvarvinnan er nógv størri vinnugrein enn feskfiskaveiðan, og tí er árinið á samlaða búskapin størri av henni.

## Árin á BTÚ av broytingum í fiskivinnu og alivinnu

| | Miðal meting | | | Betri føri | | | Verri føri | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2020 | 2021 | 2022 | 2020 | 2021 | 2022 | 2020 | 2021 | 2022 |
| Feskfiskaveiða | -0,3% | -0,4% | -0,3% | -0,3% | -0,1% | -0,1% | -0,3% | -0,7% | -0,5% |
| Flakavirkir | -0,1% | -0,1% | -0,1% | -0,1% | -0,1% | -0,1% | -0,1% | -0,2% | -0,2% |
| Onnur fiskavirkir | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| Flakatrolarar | -0,2% | 0,0% | -0,1% | -0,2% | 0,1% | 0,0% | -0,2% | -0,1% | -0,1% |
| Uppsjóvarfiskiskapur | -0,6% | -0,9% | -0,3% | -0,3% | 0,0% | 0,0% | -0,7% | -2,2% | -1,3% |
| Uppsjóvarvirkir | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| **Fiskivinna tilsamans** | **-1,1%** | **-1,5%** | **-0,8%** | **-0,8%** | **-0,2%** | **-0,2%** | **-1,3%** | **-3,2%** | **-2,2%** |
| Fiskaaling | -4,8% | -3,9% | -2,1% | -4,6% | -2,3% | -0,6% | -5,0% | -5,8% | -4,0% |
| Sláturvirkir | 0,4% | 0,2% | 0,0% | 0,4% | 0,1% | 0,0% | 0,4% | 0,9% | 0,6% |
| **Alivinna tilsamans** | **-4,4%** | **-3,7%** | **-2,1%** | **-4,2%** | **-2,2%** | **-0,6%** | **-4,6%** | **-5,0%** | **-3,4%** |
| Avleiddar vinnur | -1,0% | -1,7% | -1,2% | -0,4% | -1,1% | -0,3% | -1,3% | -1,9% | -1,5% |
| Almenni geirin | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |
| **Tilsamans** | **-6,5%** | **-6,8%** | **-4,1%** | **-5,4%** | **-3,5%** | **-1,2%** | **-7,2%** | **-10,0%** | **-7,1%** |

*Talva 4: Av tí samlaðu ávirkanini á búskapin stendur alivinnan fyri størstu afturgongdini, og fær hon búskapin at minka við 4,4 prosentum í 2020. Kelda: Egnar útrokningar.*

Mynd 27 vísir býtið av inntøkumissinum á lønir og restinntøku. Lønir er inntøkan hjá starvsfólkunum í vinnuni, meðan restinntøkurnar eru inntøkurnar hjá virkjunum til at gjalda rentur, avskrivingar og vinningsbýti við.

Í fiskivinnuni minka bæði lønirnar og restinntøkan. Orsøkin til hetta er, at manningarnar eru løntar eftir virðinum á tí, ið verður fiskað. Tá fiskaprísirnir falla, minka inntøkurnar hjá fiskimonnunum eisini. Harvið missa bæði reiðarar og manningar inntøkur, tá fiskaprísirnir falla orsakað av Covid-19.

Í alivinnuni er tað einans restinntøkan, ið fellur. Orsøkin til hetta er, at starvsfólkini í alivinnuni eru antin fastlønt ella tímalønt, t.v.s. at lønarlagið í alivinnuni broytist ikki, tá prísurin á laksi broytist. Hetta merkir, at virkini mugu bera alla niðurgongdina í inntøkuni, meðan starvsfólkini ikki taka lut í niðurgongdini. Heldur tvørturímóti. Av tí at størri partur av laksinum verður meirvirkaður, økjast lønargjaldingarnar í alivinnuni.







*Mynd 27: Í fiskivinnuni er minkingin bæði í lønunum og í restinntøkuni, meðan í alivinnuni eru tað serliga restinntøkurnar, ið minka.*

## Onnur árin á samfelagið

Niðurgongdin í BTÚ hevur eisini onnur árin á samfelagið. Serliga er talan um árin á almennu kassarnar og fólkatalið.

Eingin samlað meting er gjørd av árinunum á almennu kassarnar, men roknað verður við, at almennu inntøkurnar falla orsakað av niðurgongdini í fiski- og alivinnuni.

- Inntøkuskatturin minkar orsakað av lægri lønargjaldingum (uml. 2-3 prosent)
- Meirvirðisgjaldið minkar av lækkaða eftirspurninginum (uml. 2-3 prosent)
- Felagsskatturin minkar orsakað av minkaðu restinntøkuni (eingin meting, men munandi broyting)
- Tøkugjaldið frá alivinnuni minkar (eingin meting, men munandi broyting)

Harumframt hava broytingar í búskapargongdini eisini ávirkan á fólkatalið, men tá hevur tað týdning, at talan er um broytingar í talinum á størvum og í lønarinntøkunum. Av tí at størstu broytingarnar í vinnunum eru í restinntøkunum, eru ikki stórvegis broytingar í talinum á størvum, og tí verður ikki roknað við stórvegis broytingum í fólkatalinum orsakað av Covid-19. Tó kann væl hugsast, at tilflytingin til Føroyar minkar nakað – serliga um árinini av Covid-19 halda fram í longri tíð.

## Niðurstøður og tilmæli

Koronafarsóttin hevur havt álvarsligar búskaparligar avleiðingar um allan heimin. Føroyski búskapurin er eisini raktur, og væntaða minkingin í bruttotjóðarúrtøkuni er tann ógvusligasta, vit hava sæð í nýggjari tíð. Korona hevur sjálvandi eisini ávirkað støðuna í okkara útflutningsvinnum. Í hesari frágreiðingini hava vit lýst, hvussu og í hvønn mun føroyskar fiski- og alifyritøkur eru raktar.

Frá samrøðum við lyklapersónar í fiski- og alivinnuni er innlit fingið í, hvørji viðurskifti hava størstu búskaparliga ávirkanina á virksemi teirra. Høvuðsniðurstøðan frá samrøðunum er, at koronafarsóttin hevur havt álvarsamar búskaparligar avleiðingar. Hendan ávirkanin er serliga ígjøgnum fiskaprísirnar, sum eru falnir nógv, samstundis sum eingin stórvegis minking hevur verið í framleiðsluni.

Eisini er greitt, at nógv onnur viðurskifti hava havt búskaparliga ávirkan á virksemið. Sum dømi eru nevnd gjaldoyraviðurskiftini (NOK og USD) og oljuprísurin. Onnur viðurskifti eru eisini nevnd, so sum tilfeingisgrundarlagið og eyðkennið hjá fiskinum, t.d. fitiinnihald og rakfiskur.

Gjøgnum hagtøl frá fyritøkum eru virkisbúskaparligu viðurskiftini í 2020 samanborin við 2019 fyri at fáa eina meting av, hvussu koronafarsóttin hevur ávirkað fyritøkurnar. Hóast nógv onnur viðurskifti gera seg galdandi, er greitt, at korona hevur ávirkað søluna bæði í nøgd og virði við avleiðingum fyri gjaldførið í vinnuni. Tøkan av alifiski øktist, tá Covid-19 fór at gera um seg, og harvið fekk alivinnan minkað um váðan og økt um tøka peningin.

Royndirnar við korona hava tí eisini varpað ljós á nakrar møguleikar. Tað er heilt vist ein fyrimunur at hava meira fjølbroytni í framleiðsluni fyri at standa ímóti, tá brádligir marknaðarstoytir henda. Eitt dømi um hetta er, at alivinnan hevur mest sum alla tíðina fingið selt til onkran marknað, tí korona ikki rakti teir ymsu heimspartarnar í senn. Eisini hevur Bakkafrost gjørt íløgu í eina nýggja framleiðslulinju, sum kann økja framleiðsluna av portiónum munandi.

> Koronakanningarnar og smittusporanin hava gjørt tað møguligt at hava virksemið í gongd í so stóran mun.

Ein av høvuðsniðurstøðunum í hesari frágreiðingini er, at vit hava sera mótstøðuførar fyritøkur, sum hava klárað seg væl ígjøgnum óvanliga stóru avbjóðingarnar. Samrøðurnar við vinnulívsumboðini benda á, at fyritøkurnar hava verið sera fleksiblar og hava megnað at laga seg til broyttu umstøðurnar.

Ein fyrimunur er heilt vist, at vit í Føroyum hava havt nøkur serstakliga góð ár sum gera, at fyritøkurnar hava nakað at standa ímóti við. Tað er tó einki at ivast í, at fyritøkurnar hava eina innbygda tillagingarmentan, sum helst er úrslit av einari siðvenju í vinnum, sum eru vanar við stór príssveiggj, sum koma uttanífrá. Rávørugrundarlagið broytist á hvørjum ári, og í alivinnuni eru eisini aðrir váðar, t.d. sjúka. Flestu av vinnulívsfólkunum hava royndir við einari ella fleiri kreppum, sum hava verið ógvusligari enn koronastøðan, vit nú eru í.

Flestu av vinnulívsumboðunum hava tað í felag, at dentur altíð varð lagdur á loysnir. Hetta sást eisini týðiliga, tá ið korona brast á, og fyritøkurnar skjótt og hegnisliga skipaðu síni viðurskifti, so framleiðslan kundi ganga sína vanligu gongd. Hesin fleksibiliteturin sást eisini hjá almennu myndugleikunum og starvsfólkunum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, ið skjótt funnu loysnir við at gagnnýta vitan og útgerð, sum vanliga er brúkt til alivinnuna, og brúka hetta til koronakanningar. Tað, at koronakanningarnar og smittusporanin hava verið so munagóð, ger, at tað hevur verið møguligt at hava virksemið í gongd í so stóran mun.

Fyritøkurnar hava gjørt tillagingar til broyttu marknaðarstøðuna við at skifta ímillum marknaðarsegment og landafrøðiligar marknaðir. Orsakað av koronastøðuni í útlondum hava tær verið noyddar at selja meira í smásølu til brúkaran. Hetta verður ofta gjørt til ein keypara uttanlands, sum síðani pakkar vøruna til endaliga brúkaran. Eisini hava fleiri av fyritøkunum lagt dent á at optimera raksturin soleiðis, at tær nú standa enn sterkari enn áður.

Í greiningini har prísgongdin varð samanborin við undanfarin ár, sást, at prísirnir á fleiri týdningarmiklum fiskasløgnum eru farnir nógv niður. Harðast raktur er húkaflotin, har prísurin á týdningarmestu fiskasløgunum, toski, hýsu, longu, brosmu, og svartkalva, eru falnir nógv. Hóast koronaprísfallið hevur verið ógvusligt, hevur serstakliga góða ársbyrjanin hildið samlaða úrslitinum uppi, og líkt er til, at endaliga úrslitið helst ikki verður so vánaligt samanborið við onnur ár, tí avreiðingarvirðið fram til september í ár er minkað við sløkum 9% samanborið við ‘vanligu prísgongdina’. Góða ársbyrjanin merkti tó, at tað var væntandi, at árið 2020 fór at sláa øll met, og tí er missurin munandi størri, enn tá bert verður samanborið við undanfarin ár.

Trolaraflotin er minni ávirkaður, tí prísurin á upsa, sum er týdningarmesta fiskaslagið, er ikki fallin. Higartil í ár er avreiðingarvirðið sløk 6% lægri enn við vanligari prísgongd.

Í uppsjóvarfiskiskapinum eru prísirnir á svartkjafti eitt sindur hægri enn við vanligari prísgongd, men prísirnir á makreli og sild eru nógv minkaðir. Orsakað av árstíðarviðurskiftum merkir hetta, at uppsjóvarflotin er lítið ávirkaður higartil – avreiðingarvirðið er fyribils minkað 3%. Heldur prísgongdin sær sum higartil, og somu nøgdir verða fiskaðar sum í 2019, verður minkingin í avreiðingarvirðinum eini 5-6 prosent fyri 2020.

Framleiðslan á landi hevur gingið sína vanligu gongd. Marknaðirnir hava tó verið trekari, soleiðis at goymslurnar hava verið størri, enn tær annars høvdu verið. Keypararnir hava ikki vilja bundið seg til at keypa stórar nøgdir, og avbjóðingar hava verið við debitortryggingini hjá keyparunum uttanlands. Hetta hevur verið ein stórur trupulleiki, men tó lata virkini hampiliga væl at í september. Tey sleppa av við fiskin, og prísirnir á nøkrum vørum eru spakuliga farnir uppaftur. Minkingarnar í prísi, sum virkini hava fingið, eru fluttar á veiðiliðið. Tað vil siga, at fiskimaðurin og reiðaríini fáa minni fyri fiskin, og tað er har, neiligu avleiðingarnar vera størstar.

Laksaprísirnir hava eisini verið nógv ávirkaðir í ávís tíðarskeið, og í nøkrum vikum hava teir ligið niður móti framleiðslukostnaðinum, soleiðis at mest sum eingin vinningur hevur staðist av framleiðsluni.

Prísfallið hevur ligið um 30 prosent seinastu mánaðirnar, og enn eru eingi greið tekin um, at prísirnir eru batnandi. Fallið í prísunum hevur ikki ført til minkingar í lønargjaldingunum og virkseminum, men heldur tvørturímóti er virksemið økt, við tað at meirvirkingin av laksi er økt.

Samlaðu metingarnar av árinunum av Covid-19 á fiski- og alivinnuna og víðari á aðrar vinnur eru, at føroyski búskapurin av hesum fer at minka við umleið 7 prosentum í ávikavist 2020 og 2021. Í 2022 verður minkingin nakað minni. Havast skal í huga, at hetta ikki er ein framskriving av búskapinum, men einans ein útrokning av teimum árinum, sum Covid-19 hevur á fiski- og alivinnu. Skal ein framskriving gerast av búskapinum, mugu onnur viðurskifti takast við, t.d. árinið á ferðavinnu o.a.
Tað er greitt, at niðurgongdin í prísunum eisini fer at ávirka inntøkurnar hjá landskassa og kommunum. Serliga eru tað inntøkurnar frá felagsskatti og tøkugjaldi, ið fara at minka. Harafturímóti verður ikki roknað við stórvegis minking í inntøkuskatti, MVG og øðrum gjøldum, tí heldur alt virksemið ótarnað fram í vinnuni, fara lønarinntøkurnar ikki at broytast stórvegis orsakað av niðurgongdini.

> Samlaðu metingarnar av árinunum av Covid-19 á fiski- og alivinnuna og víðari á aðrar vinnur eru, at føroyski búskapurin av hesum fer at minka við umleið 7 prosentum í ávikavist 2020 og 2021. Í 2022 verður minkingin nakað minni.

Nøkur viðurskifti eru komin fram í sambandi við kanningina, sum hava stóran týdning fyri møguleikarnar hjá vinnuni at virka í broytiligum umstøðum. Tað var trupult og viðhvørt ógjørligt at fáa samsvar millum hagtøl frá Hagstovu Føroya og Teyggjuni. Databasurnar nýta heldur ikki somu bólkar. (Skipabólkar, reiðskapur, vinnugreinar) og avreiðingar frá teyggjuni vísa ikki, t.d. um talan er um flak ella rundan fisk. Tí er ógjørligt at fáa álítandi prísir fyri summar skipabólkar. Tað er týdningarmikið at hava álítandi hagtøl um okkara høvuðsvinnur fyri at kunna greina gongdina. Tí er okkara tilmæli, at hagtalsframleiðslan verður skipað betri í samstarvi millum tey, sum framleiða og brúka hagtølini.

Okkara greiningar vístu eisini, at stóri parturin av niðurgongdini liggur hjá restinntøkuni, t.v.s. í feløgunum sjálvum heldur enn hjá lønartakarunum. Hetta merkir, at úrslitið hjá feløgunum verður munandi verri í 2020. Eingin veit at siga, hvussu leingi prísirnir fara at vera lágir, men eitt, sum ávirkar mótstøðuførið hjá fyritøkunum, er, hvussu tilfeingis- og tøkugjøld og skattir annars vera skipað. Okkara prísgreiningar vísa eisini sera stórt sveiggj í prísunum í eitt fimm ára tíðarskeið. Sum dømi kann nevnast tilfeingisgjaldið á makreli - eitt fast gjald, sum er 1,50 kr/kg. Tað merkir, at tilfeingisgjaldið kann sveiggja úr stórum 13 prosentum upp í næstan 40 % av avreiðingarvirðinum. Hetta ger, at tá ið tíðirnar eru ringar, verður goldin ein munandi hægri partur í tilfeingisgjaldi. Gjaldið gongur tí umvent í mun til gongdina í vinnuni, so fyritøkan lutfalsliga skal gjalda mest, tá ið illa stendur til, og minni, tá ið hon hevur ráð at gjalda.

Til sammetingar verður gjaldið í alivinnuni tillagað prísinum, soleiðis at %-parturin, sum verður goldin, eisini er broytiligur. Hetta merkir, at í niðurgongutíðum er lutfalsligi parturin, sum verður goldin, minni bæði í krónum og prosentum.

Stóra niðurgongdin í úrslitinum hjá feløgunum vísir týdningin av einari skynsamari skipan av tilfeingis- og tøkugjøldum fyri at tryggja, at vit framhaldandi hava sterkar fyritøkur, sum megna at standa ímóti brádligum búskaparstoytum, og at tær eisini megna at standa ímóti í drúgvum niðurgongutíðum. Tí er okkara tilmæli at fara undir eina tilgongd at kanna ymiskar hættir at taka inn tilfeingisgjøld og at greina, hvussu teir ymisku hættirnir ávirka mótstøðuførið í vinnulívinum.

Tá tað snýr seg um at økja fjølbroytnið í vørum og marknaðum, er marknaðaratgongdin í fleiri førum ein forðing. Eitt dømi kann vera, at høvdu saltfiskavirkini havt kappingarføra atgongd til marknaðir, so

sum Brasilia, so høvdu verið størri møguleikar at selt tann vegin, tá ið suðurevropeisku marknaðirnir vóru stongdir í eitt tíðarskeið. Eisini er neyðugt at fáa kappingarføra atgongd til virkaðar fiskavørur, soleiðis at føroyskir framleiðarar kunnu virðisøkja vørurnar meira her heima til endaliga brúkaran. Tí er okkara tilmæli, at myndugleikarnir arbeiða meira miðvíst ímóti at betra um marknaðaratgongdina hjá føroyskum fiskavørum. Hetta hevði ikki bert gagnað í kreppustøðum, men hevði eisini givið føroyskum fyritøkum fleiri møguleikar at skapa virðir í gerandisdegnum.

**Tilmæli**

- At arbeiða miðvíst fram ímóti betri marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur
- At greina hvussu best er at skipa tilfeingis – og tøkugjøld, og hvussu ymiskir hættir ávirka mótstøðuførið í fyritøkunum
- At skipa hagtalsframleiðsluna betri í samstarvi millum tey, sum framleiða og brúka hagtølini

# Keldur

Búskaparráðið (2020), *Búskaparfrágreiðing, Á heysti, September 2020*, https://www.setur.fo/media/6878/230920búskaparráðsfrágreiðing-heyst-2020.pdf.

Búskaparráðið (2020), *Búskaparfrágreiðing, Á vári, mars 2020*, https://www.setur.fo/media/6401/b%C3%BAskaparr%C3%A1%C3%B0sfr%C3%A1grei%C3%B0ing-v%C3%A1ri%C3%B0-2020.pdf

Eurocontrol (2020), *Air traffic situation over Europe – 06 May 2020 vs 08 May 2019*, https://www.youtube.com/embed/oAEcLnF7d4A?autoplay=1

World Bank (2020), *Global Economic Prospects, June 2020*. Washington, DC: World Bank. DOI: 10.1596/978-1-4648-1553-9

Fíggjarmálaráðið (2020), *Búskaparfrágreiðing II – Fíggjarlógaruppskotið 2021*, Fíggjarmálaráðið, September 2020, https://lms.cdn.fo/media/14510/búskaparfrágreiðing-ii-2020-endalig.pdf?s=2XlxNr9wINuiwXPO08FmmfPPdo8

Globefish (2020a), *Impacts of COVID-19 on groundfish market: from bad to worse*, GLOBEFISH – Information and Analysis on World Fish Trade, Rom, http://www.fao.org/in-action/globefish/market-reports/resource-detail/en/c/1306825/.

Globefish (2020b), *Widespread disruption in the salmon sector,* GLOBEFISH – Information and Analysis on World Fish Trade, Rom, http://www.fao.org/in-action/globefish/market-reports/resource-detail/en/c/1306829/.

IMF (2020), *World Economic Outlook Update – June 2020*, International Monetary Fund publishing, Washington. file:///C:/Users/JM%20Guest/AppData/Local/Packages/Microsoft.MicrosoftEdge_8wekyb3d8bbwe/TempState/Downloads/WEOENG202006%20(1).pdf

OECD (2020), *OECD Economic Outlook, Volume 2020 Issue 1,* No. 107, OECD Publishing, Paris, https://doi.org/10.1787/0d1d1e2e-en

OECD (2020), *OECD Economic Outlook, Interim Report September 2020*, OECD Publishing, Paris, https://doi.org/10.1787/34ffc900-en.

*Hagtøl til útrokningar*

Bakkafrost (2020), *Interim Report – Q2 2020 and H1 2020*, Glyvrar, https://www.bakkafrost.com/media/2654/2020-q2-condenced-interim-consolidated-accounts.pdf

Fishpool 2, Fish Pool Index, Bergen, www.fishpool.eu

Hagstova Føroya 2020 www.hagstova.fo

Heilsufrøðiliga Starvsstovan 2020, Tórshavn, www.hfs.fo

Nasdaq (2020) Nasdaq Salmon Price Index, https://salmonprice.nasdaqomxtrader.com/public/report?5

Vørn (2020) ‘Veiða sambært avreiðingarseðli, www.teyggjan.fo